# GERÐABÓK

**Dato:** 28. november 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 261/19-291/19

**FUNDARLEIÐARI:**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annika Olsen
Gunvør Balle
Marin Katrina Frýdal
Jákup Dam
Turid Horn
Bogi Andreasen
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Tróndur Sigurðsson
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Halla Samuelsen
Annfinn Brekkstein

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Marius Muller
Barbara Vang
Eyðna Justinussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 261/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 1119 |
| 262/19 | 14/02038-19 | Leigusáttmálar. Neystini undir Bakka. Umsókn frá leiðarum um ættarliðskifti. | 1121 |
| 263/19 | 18/03602-1 | Leigumál til Gokart á Skarðshjalla. | 1128 |
| 264/19 | 19/04254-3 | Matr.nr. 138r, Hoyvík. Umsókn um víðarisølu av Grundstykkið við bygningi í ger. | 1131 |
| 265/19 | 18/03740-5 | Menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø | 1133 |
| 266/19 | 19/02482-1 | Útstykking til sethús í Kaldbak | 1135 |
| 267/19 | 19/04201-1 | Umsókn um stuðul til Listasavn Føroya | 1139 |
| 268/19 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 1141 |
| 269/19 | 19/00205-2 | Tórshavnar musikkskúli: Reglugerð fyri útleigu av konserthøllini v.m. | 1151 |
| 270/19 | 19/03836-1 | Eftirmeting av lógini um frítíðarundirvísing | 1154 |
| 271/19 | 19/04397-1 | Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan | 1156 |
| 272/19 | 15/00192-1 | Ferðslutryggjan av bygdavegunum í Kollafirði | 1159 |
| 273/19 | 17/03122-25 | Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF | 1162 |
| 274/19 | 18/00808-1 | Vágsbotnur - skipan av økinum | 1168 |
| 275/19 | 18/03069-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir | 1171 |
| 276/19 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 1176 |
| 277/19 | 19/04020-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 804a, Tórshavn, frá A3 til A1 | 1181 |
| 278/19 | 19/04021-1 | Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn | 1184 |
| 279/19 | 19/01620-1 | Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn | 1186 |
| 280/19 | 19/01622-1 | Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað | 1188 |
| 281/19 | 17/02864-1 | Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina | 1191 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | og skúlan á Argjahamri | |
| 282/19 | 14/01477-5 | Fríøkið við Myllutjørn - Karlamagnusarbreyt | 1194 |
| 283/19 | 19/04680-1 | Eykajáttan - umraðfestingar 2019 | 1197 |
| 284/19 | 19/04681-1 | Eykajáttan 2019 | 1200 |
| 285/19 | 19/02369-1 | Fíggjarætlan 2020 | 1203 |
| 286/19 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 1218 |
| 287/19 | 17/03154-1 | Orkupolitikkur | 1235 |
| 288/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 1240 |
| 289/19 | 19/04709-1 | Langtíðar íløguætlan 2021 til 2025 | 1243 |
| 290/19 | 19/03776-6 | Umsókn um umbýti av grundøki | 1250 |
| 291/19 | 19/04251-3 | Matr.nr. 22s, Kaldbak. Eigari vil selja grundstykkið til kommununa. | 1254 |

| | Býráðsfundur<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1119<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

***261/19 Mál beind í nevndir 2019***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 80/19 | 19/00098-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 103/19 | 19/00098-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 132/19 | 19/00098-1 |
| 7 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 191/19 | 19/00098-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 234/19 | 19/00098-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 261/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1120 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt**.**

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 262/19 Leigusáttmálar. Neystini undir Bakka. Umsókn frá leiðarum um ættarliðskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.03.2014 | 64/14 | 14/02038-19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 263/19 | 14/02038-19 |
| 3 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 240/19 | 14/02038-19 |
| 4 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 262/19 | 14/02038-19 |

**Málslýsing:**

**Talan er um til samans 8 neyst.**

Kommunan eigur grundøkini við ástandandi neystum, sum verða leigaði út til niðanfyri nevndu leigarar.

**5 sambygd neyst undir húsunum hjá Jóhan MacDonald. ( Mynd 2010-2041/4 )**

*Leigararnir eru:*

2010-1914 Jens Dam (akkurát deyður)

2010-1904 Petra Arge (brúkari Ólavur Arge)

2010-1913 Jóannes Skaale ( hevur yvirtikið sáttmálan eftir Sigfried Skaale )

2010-1905 SSB skótarnir, hava ongantíð havt sáttmála

2010-0571 Hans og Tummas Sørensen, sum hava sáttmála galdandi til 30. nov. 2014 (Hans er deyður, Tummas er sonur Hans)

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Hans Jákup Michelsen keypti í 1993, neystið frá Jens av Reyni. Upplýst verður, at Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum.

**Neyst bygt uppímóti húsagrundini hjá Jóhan MacDonald. ( Mynd 2010-2041/4 )**

2010-2408 Hans Jákup Michelsen. Sambært skjali, keypti Hans Jákup Michelsen í 1993, neystið frá Jens av Reyni.
Axel Mortensen bygdi neystið síst í 60árunum. Síðani hevur neystið havt ymiskar eigarar. ri Klæmint Ludvíg, Jens av Reyni og nú Hans J. Michelsen. Vit finna ongan sáttmála í málinum.

**Harumframt er talan um tvey leys rimaneyst longur inni móti Vágsbotni. ( Mynd 2010-2041/5)**

2009-2939 Annað neystið verður leigað út til Inga Mohr sála. Sonur Inga, Gunnar Mohr, søkir nú um at yvirtaka sáttmálan

Hitt neystið er í tveimum leigumálum:

2010-1895 Helena Poulsen (fyrrv. Símun Poulsen, deyður)

2010-1896 Jørleif Kúrberg (fyrrv. Bjarni Djurhuus flutti til DK í 1997)

Brúkarar av neystinum hjá Bjarna Djurhuus eru: Bátafelagið, Jørleif Kúrberg, og Ríkisumboðið.

Neystið er ikki skilt at, og er bert tann eina inngongdin.

**Lýsing av málinum:**
Miðfyrisitingin hevur umrøtt málini viðvíkjandi neystunum.

- Sáttmálarnir eru ikki tíðarhóskandi.
- Mannagongdir vænta. ( reglur um ættarliðskifti )
- Eingin bíðilisti er til neystini.
- Kommunan hevur viðlíkahaldsskyldu av neystunum.
- Einki krav er til nýtslu av neystunum.

Eingin bíðilisti er til neystini og eru heldur ongar niðurskrivaðar mannagongdir viðvíkjandi umsitingini av leigumálunum.

Vanligi borgarin hevur lítlan og ongan møguleika til at fáa atgongd til neystini, sum hava gingið í arv í fleiri ættarlið. Ættarliðskifti hevur verið fyrilagt fíggjarnevndini so hvørt.

Neystaleigan hevur higartil verið kr. 60,00 pr. ár. Fyri hesa upphædd fær leigarin eitt grundøki við ástandandi neysti til leigu, samstundis sum kommunan hevur viðlíkahaldskylduna av neystunum.

Neystini liggja í einum serstøkum umhvørvi, og eru neystini so mikið smá, at tey bert kunnu brúkast til smærri og lættari bátar. Tey innaru neystini kunnu illa brúkast til bát, tí umstøðurnar kring neystini ikki eru til tað. Høgur bryggjukantur + koyrivegur.

Løgdeildin hevur hugt eftir neystunum.

Neystini undir húsunum hjá Jóhan Macdonald sýnast at vera í nýtslu og eru væl hildin. Bátur stendur inni í 4 av neystunum. Eitt stendur tómt. Eitt av neystunum er blendað og sæst ikki inn.

Neystið hjá Hans J. Michelsen, er í vánaligum standi, og treingir til ábøtur. Hans J. greiðir frá, at hann hevur umvælt framsíðuna av neystinum, og hevur hann nú ætlanir um at umvæla takið og síðuna. Hann greiðir frá, at Kiwanis er brúkari av neystinum, og hevur hann ætlanir um at lata Kiwanis neystið til nýtslu, men ynskir hann í fyrsta umfari at gera ábøturnar á neystið og at undirskriva nýggjan leigusáttmála við kommununa.

Í tí eina neystinum longur inni, er rættuliga órudduligt, og sýnist neystið ikki væl hildið. Tvær kajakkir liggja inni hesum neystinum.

Hitt neystið er væl hildið, og hevur Bátafelagið tilfar liggjandi inni, sum verður brúkt til bryggjudansin. Harumframt goymir Ríkisumboðið ymiskt sum hoyrir til bátin Torshavn, inni í sama neysti. Ein gamal bátur hongur undir loftinum.

Verandi leigarar sum eru í neystinum, hava trupult við at semjast um neystið.
Helena Poulsen, sum leigar helvtina av neystinum, hevur okkum kunnugt ikki brúkt neystið, men eru døturnar nú áhugaðar í neystinum.

Ósemjan snýr seg millum annað um eitt lás og um atgongdina til neystið. Um hvør skal hava lykil til neystið, og um at Bátafelagið hevur lagt ymiskt tilfarð inn á helmingin hjá Helenu Poulsen.
Tað skal viðmerkjast at kommunan ikki hevur tosað við Helenu um málið. Samskiftið hevur verið við einu dóttur hennara sum er búsitandi í Danmark.
Kommunan ynskir ikki at vera partur av málinum, og mugu brúkararnir finna eina loysn sínámillum.

Umsitingin hevur umhugsað 3. møguleikar til framhaldandi nýtslu av neystunum.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og fáa verandi leigarar bjóðaðan nýggjan sáttmála. Sí hjálagda sáttmála sum er journaliseraður undir mál 2010-2041/3 Samstundis verður sum higartil møguligt at søkja um ættarliðskifti.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini framyvir bjóðaði kappróðrar/- og øðrum áhugafelagskapum til leigu. Skúlar/frítíðarskúlar og líknandi, kundu tá eisini fingið møguleikan at brúkt neystini í samstarvi við omanfyri nevndu feløg. Um so var kundu kannska fleiri hundrað brúkarar verið knýttir at neystunum, og kundu neystini tá í nógv størri mun enn nú verið nógv fleiri borgarum at gagni.

Verandi sáttmálar verða uppsagdir, og verða neystini lýst til sølu til hægstbjóðandi. Undirlendið undir neystunum verður leigað keyparunum. 30 ára langtíðarsáttmálar.

Umsitingin hevur eisini gjørt uppskot til nýggjan leigusáttmála.

Ætlanin er at leigan verður hækkað, men verður leigan ymisk alt eftir um talan er um privatleigumál, ella um talan er um leigu til ítróttar/áhugafeløg.

Harumframt er eisini talan um í tí eina førinum, um at leiga undirlendið til neystið tí neystið er privatogn.

Sáttmálarnir verða yvir 3 ár, og kunnu tá endurnýggjast eftir umbøn.

Fyri tey neyst sum eru ogn, og har ið kommunan eigur undirlendið, verður leigumálið yvir 10 ár, og kann endurnýggjast, um báðir partar ynskja tað.

Sambært grein 3. í sáttmálanum, kemur leigarin eisini at hava innan- og uttanveggja viðlíkahald av neystinum, herundir at síggja til, at neystið við jøvnum millumbilum, verður málað við svartari máling. Her verður hugsað um rimaneystini undir Bakka og neystið hjá Hans Jákup Michelsen

Neystini ( húsagrundin ) sum er undir húsunum hjá Jóhan Mc.Donald, skulu málast hvít og neystahurðarnar svartar.

Sambært grein 4. í sáttmálanum skal neystið einans verða brúkt til bát, í javnan verður brúktur, og neyðug amboð í hesum sambandi. Tá ið talan er um almannagagnligt virksemi, kann kommunan í ávísum førum gera undantak frá hesi áseting, men er tað tá ein treyt, at virksemið er tengt at sjónum.

**Tilmæli:**
Leiðarin av løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin, mæla til at kommunan:

- Uppsigur verandi leigusáttmálar.
- Bjóðar verandi leigarum nýggjan sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2041/3 og Hans J. Michelsen sáttmála sum er skrásettur undir mál 2010-2408/2
- Bjóðar tey neystini út til róðrarfeløg, ítróttarfeløg og møgulig áhugafeløg, har møguligir verandi leigarar ikki ynskja at skriva undir nýggjan sáttmála.
- Prísásetur leiguna til kr. 500,00 pr. ár. um neystini verða leigað út til ítróttarfelag/áhugafelag og til kr. 5.000,00 pr. ár. um talan er um privatleigumál.
- Prísásetur leiguna til ávikavist kr. 500,00 og kr. 2.000,00 pr. ár. fyri teir sáttmálar sum umfata undirlendið undir neystunum, tí neystini eru privatogn.

**Fíggjarnevndin 17. november 2010:** Samtykt at siga upp allar leigusáttmálar við stytst møguligari freist og gera nýggjan leigusáttmála við teir leigarar, sum vilja ganga undir hesar treytir: Leigarin hevur viðlíkahaldsskyldu innan og uttan, leigan verður hækkað til 2.500 kr. um árið, og leigumálið skal brúkast til endamálið, ið er at goyma bát og reiðskap og virksemið, ið er knýtt at sjónum.

Tey leigumál, ið ikki verða endurnýggjað, verða eftir umsókn latin áhugafelagsskapum, kapproðrarfeløgum, skúlum, frítíðarskúlum og øðrum almannagagnligum endamálnum, og verða hesi at ganga undir somu viðlíkahalds- og aðrar treytir sum ásett omanfyri, tó so at leigan hjá hesum verður ásett til 1.000 kr. um árið.

**Ìskoytið:**
Neystini úti í Bakka eru partur av eini størri heild, frá Vágsbotni út í Skinnaraskjer/Rasmusarbrúgv. Tað er eitt økið, sum um summari er væl vitja av fólki. Her er útilív og sera hugnaligt at ganga. Tað eru tí ynskir um at skapa eina størri heild á økinum við útatvendum virksemi.

Tórshavnar havn arbeiðir eisini við ætlanum um at fríðka um økið og leggja fleiri bátabrúgvar út. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis.

Kommunan hevur eisini í fleiri ár arbeitt við at skapa lív í Vágsbotnið við útivirksemið av ymiskum slag.

Í Tórshavnar Býaratlas'ið verður skrivað: "*Goymsluhúsini undir Bryggjubakka standa við sínum takskjøldrum sum ein virðismikil framsíða móti havnarlagnum. Bryggjan verður í dag mest brúkt til parkeringar, men har verður eisini fiskur seldur, og ein kaffistovan borðreiðir úti, tá ið veðrið er til vildar. Kanska er hetta ein varislig byrjan til eina "havnapromenadu" við lívd og sól, sum kundi ført til fleiri uttanduratiltøk framman fyri teimum niðastu húsahæddunum, umframt færri parkeringar og nýggja útgerð av ymiskum slag á bryggjuni"(s. 23).*

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri løgdeildina mæla tí fíggjarnevndini til at heita á Byggi- og býarskipanarnevndina um at gera eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til

Skinnaskjer/Rasmusarbrúgv við tí endamálið at skapa eina “havnapromenadu” við útivirksemið av ymiskum slag.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin í samráð við Tórshavnar Havn ger eina ætlan fyri økið.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Vísandi til samtyktina í fíggjarnevndini 16. februar 2011 verður rykt eftir uppskotinum til eina heildarætlan fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv at taka støðu til sum skjótast.

**Ìskoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til heildarætlan fyri økið við Vágsbotn og undir Bryggjubakka.

Heildarætlanin inniheldur broytingar av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn og eitt uppskot til skipan av økinum frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við heildarætlanini og senda málið til býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Bogi Andreasen hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Býararkitekturin greiddi frá uppskotinum til heildarætlan. Samtykt at taka undir við uppskotinum til heildarætlan og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina við áheitan um at broyta serstøku byggisamtyktina samsvarandi uppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin samtykti at málið um broytingar í serstøku byggisamtyktini skal verða eitt mál fyri seg, sum verður lagt fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Býráðið 31. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini hin 31. mai 2012, verður málið um broytingar í serstøku byggisamtyktini viðgjørt sum eitt mál fyri seg. Sí j. nr. 2012-1374.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
2 eigarar hava søkt um ættarliðsskifti.

Ein trupuleiki við at loyva ættarliðsskifti er at kommunan missir ræðisrættin til neystini langa tíð framyvir, men vísandi til at sáttmálarnir einans hava gildið í 3 ár frá

undirskrivingardegnum, verður mett at váðin hjá kommununi verður óbroyttur, hóast nýggjur leiðari kemur inn.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at bíða við at viðgera, um møguleiki skal vera at ættarliðsskifta, til samtyktin í fíggjarnevndini 16/2-2011: "heildarætlanin fyri økið frá Vágsbotni til Skinnasker/Rasmusarbrúgv við tí endamáli at skapa eina "havnapromenadu" við útivirksemið av ymiskum slag" er avgreidd.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Innlendismálaráðið góðkendi 11. november 2011 eftir áheitan frá Tórshavnar býráð broytingar í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og Reyn. Broytingarnar merkja, at niðasta hædd í bygningunum undir Bryggjubakka skal nýtast til útvent virksemi, og at nýggjur umráðispartur, F-neystaøki, ið fevnir um økið, har neystini úti á Bakka eru staðsett, skal nýtast til frítíðar- og ítróttarvirksemi, ið hava við sjógvin at gera.

Samstundis verður víst til heildarætlanina fyri økið frá Vágsbotni til Skinnarasker/Rasmusarbrúgv, ið varð samtykt í býráðnum tann 28. juni 2012 saman við broytingunum í byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn.

Endamálið við at broyta byggisamtyktina og við heildarætlanini fyri økið var at menna ferðafólka- og býarlívið. Tí varð samtykt at leggja økið úti á Bakka sum eitt neystaøki við ásetingum um nýtslu av neystunum til frítíðar- og ítróttarvirksemi, sum hevur við sjógvin at gera, t.d. kappróður og kajakk, og til onnur ting sum kunnu menna ferðafólka- og býarlívið her, t.d. felagsskapir av ymiskum slag.

Við atliti til at fremja endamálið við broyttu byggisamtyktini og heildarætlanini fyri økið, hevur umsitingin havt fundir og samskift við teir privatpersónar, sum hava leigusáttmála við Tórshavnar kommunu um neyst undir Bakka, sí fundarfrágreiðingar í málinum.

Upplýst er fyri leigarunum, at byggisamtyktin fyri økið er broytt, og at ein heildarætlan fyri økið leggur upp til, at neystini skulu nýtast til frítíðar- og ítróttarvirksemi hjá áhugafeløgum.

Talan er um fimm leigarar, sum allir hava havt leigumál við Tórshavnar kommunu í nógv ár. Allir fimm leigarar hava ynski um at sleppa at halda fram við leigumálunum, og teir vísa m.a. á, at neystini verða javnan brúkt til virksemið, sum hevur við sjógvin at gera, eitt nú eru bátar í fleiri av neystunum, sum verða brúktir til útróður og til veiðu av fugli umframt frítíðarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.

Tórshavnar kommuna hevur leigusáttmálar við Kajakkfelagið og Tórshavnar Froskmannafelag um tvey av neystunum. Annað av teimum er neyst, ið privatur leigari og Kajakkfelagið hava verið felags um, men trupult hevur verið at samantvinna áhugamálini hjá hesum báðum pørtum. Ætlanin er tí at siga leigumálið við privata leigaran upp og geva teimum báðum áhugafeløgunum fullan ræðisrætt á neystunum.

Hini fýra neystini, ið privat leiga, er ætlanin at nýta til at røkka endamálinum við broyttu byggisamtyktini, ið er at nýta økið til frítíðar- og ítróttarvirksemi, sum hevur við sjógvin at gera og annað, sum kann menna ferðafólka og býarlívð í býunum. Í skrivi, sum er viðfest málinum, er nærri frágreiðing um ætlanirnar hjá viðkomandi feløgum.

Skulu teir fimm privatu leigararnir av neystum undir Bakka sigast upp, verður mett at ein hóskandi uppsagnarfreist er seks mánaðir, so leigararnir fáa rímiligt skotbrá at rudda neystini og avgreiða tað virksemið, ið er í neystunum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at uppsiga tey fimm leigumálini við privatu leigararnar av neystum undir Bakka til at fara úr gildi um seks mánaðir.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson krevja avgerðina fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson biðja um at fáa avgerðina frá fíggjarnevndini fyri býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

# 263/19 Leigumál til Gokart á Skarðshjalla.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 66/19 | 18/03602-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 296/19 | 18/03602-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 263/19 | 18/03602-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Leigusáttmáli fyriliggur uppá grundstykkini í útstykkingini á Skarðshjalla. Talan er um stykkini 15, 16, 17 og 18 við eini samlaðari mettari vídd á uml. 6.600m2.

Stykkini eru seinni matrikulerað til trý grundstykkir við eini samlaðari vídd á 6.130m2. Søluprísurin á stykkjunum er 7,97 mill. kr.

Í leigusáttmálanum verður viðmerkt, at økið verður at brúka sum 3 ára royndarverkætlan til Go-kartbreyt.

Sáttmálin er undirskrivaður 10.02.2016 og tekur við, tá leigarin sleppur inn á økið. Økið er avhendað kommununi 29/4-2016, og sostatt kann staðfestast, at leigusáttmálin tók við umleið mánaðarskiftið apríl-mai 2016.

Leigukostnaðurin fyri økið er 100 kr. um árið. Verandi leigari hevur gjørt ymiskar íløgur í økið og skal sambært sáttmálanum lata økið aftur í sama standi, sum tá leigarin tók við økinum.

Sambært sáttmálanum endar leigumálið 3 ár eftir, at leigumálið tók við. Sostatt endar leigumálið umleið mánaðarskiftið apríl-mai 2019.

Í máli 15/03908 – Umsókn um langtíðarleigu av vinnustykki til Go-kart koyring - framgongur, at tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsøkjarin kann leiga stykkini 15 – 18 í eini royndartíð, ið er trý ár, og at leigusáttmálin kann sigast upp, tá ið keypari er til útleigaðu stykkini.

Seinastu tíðina hevur sølan av vinnustykkjum á Skarðshjalla gingið væl. Øll stykkini eru umbiðin/seld tó við undantaki av stykkjunum, sum verða brúkt til go-kartvirksemið.

Stykkini hava ikki staðið á sølulista, vísandi til, at tey ikki eru tøk.

Umframt at áhugin fyri vinnustykkjum á Skarðshjalla er stórur, hevur Tórshavnar kommuna í løtuni ítøkiligar fyrispurningar frá trimum áhugaðum keyparum.

Eingi stykki eru tøk í vinnuútstykkingini at bjóða hesum áhugaðu keyparum, og kommunan hevur í løtuni ikki onnur vinnustykki at bjóða áhugaðum keyparum.

Viðmerkjast kann eisini, at innasta vinnuøkið á Skarðshjalla er selt dóttirfelag hjá Bakkafrost at byggja biogassverk á, og sostatt er hetta økið heldur ikki tøkt at bjóða øðrum keyparum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:** Leigusáttmáli ( 15/03587 ) Fíggjarnevndarsamtykt ( 15/03908 )

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunstjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at enda royndarverkætlanina við go-kartvirksemi á Skarðshjalla, tá ið leigumálið gongur út, og at fara undir sølutilgongdina av teimum trimum vinnustykkjunum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til at leingja leigumálið við tveimum árum.

Tróndur Sigurðsson krevur málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:**

Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Anniku Olsen um at fáa málið aftur í nevnd, ið fall við 7 ímóti, 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá javnarflokkinum og sambandsflokkinum: Mælt verður til at leingja royndarverkætlanina við tveimum árum**.**

Broytingaruppskotið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn og Bogi Andreasen.

## 264/19 Matr.nr. 138r, Hoyvík. Umsókn um víðarisølu av Grundstykkið við bygningi í ger.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 294/19 | 19/04254-3 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 264/19 | 19/04254-3 |

**Upprunin til málið:** Umsókn dagfest 21.okt. 2019

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Viðvíkjandi grundstykki matr.nr. 138r, Hoyvík. Karlamagnussarbreyt.
Vídd á grundstykki 745,92m2, harav byggifeltið er 470,92m2

Eigararnir eru byrjaðir bygging.

Sp/f Protek, metir virðið av gjørdum arbeiði á matriklinum til kr. 1.717.199,01, harav projektering og mynduleikagóðkenning kr. 750.000,00

Søluprísurin fyri grundstykkið var kr. 872.800,99 og verður mett virðið í alt kr. 2.590.000,00 og mælir advokatur eigarans til at víðarisøluskeytið verður skrivað við upphædd kr. 2.590.000,00

Byggiloyvi fyriliggur til handils og íbúðarbygning í 3 hæddum. 16/04151-19 og 22. Tekning av bygningi. 19/04254-17.

Advokatur umsøkjarans søkir vegna verandi eigarar um loyvi til at avhenda grundstykkið matr.nr. 138r, við bygningi í ger, til eitt smápartafelag Sp/F Rangi, sum eigararnir hava stovnað og sum skal liðugtgera bygningin.
Sambært § 3 í tinglýsta skeytinum, kann eigarin ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá seljara fyrrenn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið frá Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn.

Sambært tinglýstum servitutti kann seljarin ( Tórshavar kommuna ) til eina og hvørja tíð krevja sær ognarrættin til stykkið aftur móti at endurrinda eigaranum avtalaða keypspeningin aftur.
Er nøkur bygging farin fram, endurrindar seljarin ( Tórshavnar kommuna ) keyparanum harumframt skjalprógvaðar útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda. Semjast partarnir ikki verður málið lagt fyri gerðarætt til avgerðar.

Upplýst verður, at tað sum higartil er gjørt er, at alt fyrireikingararbeiðið er gjørt, og klárt er at fara í holt við sjálvan bygningin.

Upplýst verður, at nýggja felagið hevur fingið tilsøgn um fígging av bygninginum og er ætlanin at seta ferð á byggingina.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1132 |
| | Formansins merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik ímun til tinglýstan servitutt.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn um ognarskifti. Umsókn um byggiloyvi. V.m.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisøluna og at víkja forkeyps/afturkeypsrættin í hesum føri. Servituttir verða óbroyttir galdandi.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 265/19 Menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.05.2019 | 28/19 | 18/03740-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 158/19 | 18/03740-5 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 30.09.2019 | 7/19 | 18/03740-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 302/19 | 18/03740-5 |
| 5 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 265/19 | 18/03740-5 |

**Upprunin til málið:**
Ferðavinnupolitikkurin ásetir 23 tilmælir. Eitt av teimum er nr. 17 Menning av økjum í kommununi innan ferðavinnu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Á heysti 2018 søkti Tórshavnar kommuna um stuðul frá Visit Faroe Islands til at gera eina menningarætlan fyri ferðavinnuna í Kirkjubø. Umsóknin varð játtað og 1. desember fór Visit Tórshavn undir at gera menningarætlanina. Hetta arbeiði er nú liðugt, og Visit Tórshavn ætlar at leggja menningarætlanina fram á almennum fundi 21. mai í Kirkjubø.

Visit Tórshavn vísir á 6 yvirskipað átøksøkir í menningarætlanini. Nøkur átøk kunnu setast í verk beinanvegin, meðan onnur krevja meiri arbeiði. Nøkur átøk kann kommunan gera, meðan aðrar uppgávur liggja hjá Landsverki, Tjóðsavninum og øðrum, ella í samstarvi millum fleiri partar. Tað er tí ikki vist, at komið verður á mál við øllum átøkunum. Hinvegin er hetta fyrsta stig, har avbjóðingar og átøk verða lýst.

Visit Tórshavn hevur gjørt eitt uppskot til tíðar- og kostnaðarætlan yvir tey átøk, sum tey meta kunnu gerast í 2019 og 2020.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | X |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir vinnunevndini til at taka undir við menningarætlanini. Umsitingin vendir aftur við einum tilmæli um, hvat verður sett í verk í 2019, og hvussu tað verður fíggjað, tá menningarætlanin er løgd fram.

**Vinnunevndin 14. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Samtykt at beina málið í Kirkjubøar- og Velbastaðarnevndina.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 30. september 2019:** Umboð frá Visit Tórshavn kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

## 266/19 Útstykking til sethús í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 128/19 | 19/02482-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 24.06.2019 | 4/19 | 19/02482-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 213/19 | 19/02482-1 |
| 4 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 184/19 | 19/02482-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 221/19 | 19/02482-1 |
| 6 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 196/19 | 19/02482-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 266/19 | 19/02482-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 241/19 | 19/02482-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 72/19 | 19/02482-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 182/19 | 19/02482-1 |
| 11 Kaldbaksnevndin | 19.11.2019 | 7/19 | 19/02482-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 327/19 | 19/02482-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 266/19 | 19/02482-1 |

**Upprunin til málið:**
Á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 4. september 2018 varð samtykt, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við at kanna møguleikarnir fyri útstykking í Kaldbak, sí mál *Sethúsaútstykking í Kaldbak. Kanna møguleikar fyri at stykkja út til sethúsagrundstykkir í Kaldbak.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tekniska umsitingin hevur gjørt eina yvirskipaða kostnaðarmeting av, hvør kostnaðurin er fyri at gera útstykkingina, og verður tað mett, at samlaði kostnaðurin verður umleið 2,5 mió. Tá er vegur, leiðingar, keyp av lendi, ráðgeving og umsiting við í metingini.

Fyri at halda útreiðslunum niðri, soleiðis at grundstykkjaprísurin ikki verður alt ov høgur, verður mælt til, at grundøkini verða seld óplaneraði.

Ítøkiligi kostnaðurin fyri útstykkingina og harvið ítøkiligi kostnaðurin av grundstykkjunum verður at lýsa nærri, tá verkætlanin er boðin út og tilboð frá arbeiðstakarum fyriliggja.

Váttan frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi fyriliggur, sí skjal *Váttan um keyp av lendi.*

Byggisamtyktarliga liggur økið, sum ætlanin er at útstykkja á, í A-øki í byggisamtyktini fyri Kaldbak. Sambært ásetingunum fyri A-øki í Kaldbak, skulu grundøki vera í minsta lagi 500 $m^2$ til støddar, meðan býráðið kann loyva grundøkjum, sum eru niður til 300 $m^2$ til støddar inni í bygdini. Grundstykkini, sum eru teknað í útstykkingarætlanini, eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Um samtykt verður, at verkætlanin skal setast í verk, so verður verkætlanin flutt á Verkætlanardeildina at útinna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

*Sethúsaútstykking í Kaldbak. Kanna møguleikar fyri at stykkja út til sethúsagrundstykkir í Kaldbak,* journal nr. 18/000161

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Útstykking 22.05,* journal nr. 19/02482-2.
*Kortskjal. Byggisamtykt í Kaldbak,* journal nr. 19/02482-2.
*Váttan um keyp av lendi,* journal nr. 19/02482-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at seta verkætlanina í gongd,
- at játta 300.000 kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L00001 Løgukarmur fyri árið, til kommunala umsiting og møguliga ráðgeving, til gerð av nøktandi arbeiðstekningum og at bjóða arbeiðið út til arbeiðstakara at útinna.
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Nevndin mælir býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at bjóða økið til almenna sølu til sethúsabygging sambært ætlanini og við treytum sum umsetingin setir.

**Kaldbaksnevndin 24. juni 2019:** Staðbundna nevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini 18. juni 2019.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Búnaðarstovan hevur givið kommununi tilsøgn um at kunna keypa lendið til útstykkingina. Talan er um uml. 3.200m2 og er mettur kostnaður til samans kr. 400.000,00

Festarin er ikki ímóti ætlanini, men ynskir at fáa avtalu í lag við kommununa sum umfatar, at avgrevsturin frá útstykking verður fluttur yvir á lendið við grótbrotið, har moldin kann breiðast út. Kommunan eigur lendið niðanfyri grótbrotið, men hevur brúkar festarin lendið til seyðahald. Fyri útstykkjaran verður talan um ein fyrimun. Styttri teinur og tí bíligari koyring.

Festarin leggur eisini upp at hann fær eitt endurgjald fyri mist dyrkingarlendi, sum hann kann brúka til at velta annað lendið.

Ítøkiliga vísir festarin til matr.nr. 104, Kaldbak. Talan er um eina trø, sum hoyrir til festið.

Búnaðarstovan hevur gjørt eina veltiætlan fyri økið. Mettur kostnaður uml. kr. 105.000

Samlaður kostnaður fyri keyp og endurgjald verður tá uml. kr. 505.000,00

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa lendið fyri kr. 400.000,00 og at samsýna festara við eini upphædd áljóðandi kr. 105.000,00 sum skal brúkast til velting av matr.nr. 109, sí uppskot til veltisætlan frá Búnaðarstovuni. Upphæddin skal játtast av konto 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Marin Katrina Frýdal fór av fundinum og Jógvan Arge tók sæti fyri hana.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Kommunan lýsir nú økið alment til sølu, við treytum, sí uppskot til lýsing og alment úboð. Ásettur minstiprísur verður kr. 510.000,-

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at lýsa økið til sølu, við teimum treytum sum kommunan setur. Sí lýsing og útbjóðingartilfar, skjal. 19/02482-12.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og ein blonk**.**

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Síðani málið var fyri í byggi- og býarskipanarnevndini, hevur m.a. staðbundna nevndin í Kaldbak ynskt at broyta útstykkingina, soleiðis at tað verða 6 grundstykkir í staðin fyri 5.

Útbjóðingartilfarið er nú tillagað, soleiðis, at samlaða økið er uml. 3.200 $m^2$ og fáast kunnu 5 til 6 sethúsagrundstykkir á 400 $m^2$ til 500 $m^2$, umframt felags fríøki.

Tann sum keypir økið, átekur sær at gera útstykkingarprojekt, fáa øll neyðug loyvi til vega og at gera útstykkingina sambært treytunum í útbjóðingartilfarinum.

Ein treyt í útbjóðingartilfarinum er, at sami persónur kann ikki standa sum eigari fyri fleiri óbygdum grundstykkjum.

Tá liðugt útstykkingarprojekt fyriliggur, verður málið lagt fyri aftur byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevnd til endaliga góðkenning.

Málið er lagt fyri teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin góðkennir útbjóðingartilfarið og beinir málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 19. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 267/19 Umsókn um stuðul til Listasavn Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 274/19 | 19/04201-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 247/19 | 19/04201-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 267/19 | 19/04201-1 |

**Upprunin til málið:**
Umbøn frá nevndarformanninum í Listasavni Føroya.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Um Listasavn Føroya
Listasavn Føroya fevnir um framsýningarhúsið Listaskálan, aðrar ognir og almenna savnið av føroyskari list. Listasavn Føroya røkir myndlistaliga mentanararv Føroya við innsavning, varðveiting, skráseting, gransking og miðlan. Listasavn Føroya ger savnsins listaverk atkomulig fyri almenningin og letur tey vera tøk til gransking. Listasavn Føroya savnar og keypir føroyska myndlist, og kann savna inn aðra list, tá listafólk og listaverk fakliga kunnu setast í samband við Føroyar.

Stuðul o.a.
Mentamálanevndin í Tórshavnar kommunu hevur í fleiri ár játtað uml. 150 tkr. í árligum rakstrarstuðli til Listasavn Føroya. Seinasta 11. september 2019. Sbrt. galdandi viðtøkum fyri savnið hevur Tórshavnar kommuna ein lim í stýrinum fyri savnið (er innanhýsis skipað sum Listasavn Føroya og Sjálvsognarstovurin Listasavn Føroya). Listasavnið fær árligan rakstrarstuðul fra landinum - í 2018 á 2.284 tkr. Samlaði umsetningurin í 2018 var uml. 3,7 mio.kr.

Savnið hevur fíggjarligar avbjóðingar a í sambandi við bygningsviðurskifti, har tað er átroðkandi tørvur á umvælingum av m.a. takinum. Løgtingið hevur júst játtað 500 tkr. til endamálið. Formaðurin í stýrinum fyri savnið hevur spurt um Tórshavnar kommuna kann veita stuðul á 71 tkr. í sambandi við serliga brandvakt, ið er neyðugt í sambandi við umvælingarnar av takinum v.m.

Á mentanarstuðulskontunum er ikki peningur tøkur til endamálið í verandi støðu. Møgulig upphædd kann játtast av konto aðrar útreiðslur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

## Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

## Skjøl

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 71.000 kr. sum stuðul av konto 20910 aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

## 268/19 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:
- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8
- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og

sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu rættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri virkismøguleikum og skjótibreytum.

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**

Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna, *sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

<u>Ítróttarlig krøv</u>: Ásetingar fyri mát/støðd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

<u>Trygdarkrøv</u>: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

<u>Umhvørviskrøv</u>: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
*- Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
*- Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
*- Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lættari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 269/19 Tórshavnar musikkskúli: Reglugerð fyri útleigu av konserthøllini v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 91/19 | 19/00205-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 301/19 | 19/00205-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 307/19 | 19/00205-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 269/19 | 19/00205-2 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í summar verður nýggi skúlabygningurin við Hans Andriasar gøtu tikin í nýtslu, herundir stásilig orkesturhøll. Hóskandi er at fáa gjørt eina reglugerð fyri brúki av høllini og øðrum hølum skúlans.

Í sambandi við at nýggi bygningurin skal takast í nýtslu í summar er farið undir at gera reglugerð fyri brúki av bygninginum bæði í mun til skúlans vanliga virksemi og annað uttanhýsis virksemi, herundir virksemi hjá teimum trimum orkestrunum, sum í høvuðsheitum eru mannaði við yrkisútbúnum tónleikarum t.e. Føroya Symfoniorkestri, Aldubáruni og Tórshavnar Big Band.

Ymisk atlit eru tikin í uppskotinum m.a. viðv. ikki at virka kappingaravlagandi, at meginvirksemið skal vera tónleikur og annað líknandi mentanarligt virksemi.

Størri konsertir v.m. kemur at seta krøv til tænastu og tøkni, ið skal vera til taks fyri at kunna veita góðar og tryggar karmar fyri góðum upplivingum. Hetta er skúlin í holt við at fyrireika.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Sí uppskot til reglugerð.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ongir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Skúlabyggingin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ikki viðkomandi

**Umhvørvisárin**
Avmarkað, men sjálvsagt skal virksemi í skúlanum halda seg til galdandi politikkir vm. innan umhvørvisøkið hjá TK.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ætlanin er at fáa viðmerkingar frá Námsfrøðiliga ráðnum í skúlanum, musikkskúlanevndini v.fl.

**Skjøl**
Uppskot til reglugerð.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at senda uppskotið til hoyringar hjá viðkomandi pørtum.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskotið hevur verið til hoyringar á Tórshavnar musikkskúla.

A. Viðmerkt verður, at § 2 er avmarkandi hvat viðvíkur at endamál skúlans verður útint í bygninginum við Hans Andriasar gøtu. Formenninir fyri Aldubáruna, Tórshavnar Big Band og Føroya Symfoniorkestur taka undir við ætlanini.
Hetta er ikki hugsað avmarkandi, og verður tí mælt til at broyta orðingina til at vera:
"§ 2. Endamál skúlans verður útint við útgangsstøði í bygningi innihaldandi skúla og konserthøll bygdur til endamálið við Hans Andriasar gøtu, Tórshavn

B. Viðmerkt verður, at § 6 krevur avtalu við nevndu eindir, tí talan er um eindir, ið eru óheftar av skúlanum. Tí verður mælt til at broyta orðingina til at vera:
"§ 6. Umframt Tórshavnar Musikkskúla, so kann skúlin eisini sbrt. avtalu hýsa umsiting, virksemi og nóta- og ljóðførisgoymslu hjá Føroya Symfoniorkestri, Aldubáruni og Tórshavnar Big Bandi í bygninginum."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjáløgdu reglugerð við nevndu broytingum til § 2 og § 6. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**

Mett verður, at grein 6 í uppskotinum eigur ikki at vísa til ávís orkestur og bólkar, sum nú eru, men eigur at vera almenn áseting. Skotið verður tí upp at broyta grein 6 soleiðis:

*§ 6. Eftir skrivligari avtalu við skúlans leiðslu kann Musikkskúlin hýsa umsiting, nóta- og ljóðførisgoymslu hjá orkestrum og bólkum í bygninginum. Hesi orkestur og bólkar kunnu eisini brúka hølini til venjingar og framførslur í tann mun, rúm er fyri tí, og kunnu seta fram ynski um at bóka høli um heimasíðu skúlans.*

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta grein 6 samsvarandi orðingini omanfyri.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við reglugerðini við tilmæltu broytingini í grein 6 omanfyri og at leggja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 270/19 Eftirmeting av lógini um frítíðarundirvísing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 274/19 | 19/03836-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 308/19 | 19/03836-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 270/19 | 19/03836-1 |

**Upprunin til málið:**
Lóggávan innan frítíðarundirvísing krevur eina eftirmeting og at verða endurskoðað, m.a. tí samsvar ikki er ímillum praksis á økinum og lógarásetingar. Landsgrannskoðanin hevur m.a. boðað frá, at lógin í stóran mun skal verða fylt út við almennum fyriskipanum gjørdar av landsstýrinum, ið ikki eru gjørdar.

**Samandráttur**
Umsitingin hevur gjørt eina gjøgnumgongd og eftirmeting av lógini saman við leiðarannum á Kvøldskúlanum. Ætlanin er umvegis Kommunufelagið at fáa landsstýrið at dagføra lógina.

**Lýsing av málinum**

<u>Eftirmeting og endurskoðan av lógarkørmunum fyri frítíðarundirvísing</u>
Í stevnumiðunum hjá mentamáladeildini/trivnaðarfyrisitingini er at tryggja, at skipanir, tilboð og karmar støðugt verða ment, eisini í samstarvi við aðrar myndugleikar, stovnar, felagsskapir og einstaklingar. Í heusm liggur eisinin støðugt at fremja og eftirmeta arbeiðsgongdir, seta mál og leggja ætlanir fyri virksemisøkið. Í hesum sambandi hava fleiri stovnsleiðarar innan mentamálaøkið víst á tørvin á eftirmeting av rammufyritreytum innan teirra virksemisøki.

Farnu árini eru fleiri lógir eftirmettar og er her so talan um enn eina av teimum lógunum, ið eru innan mentamálaøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 124 frá 10. december 2003

**Upplýsingar frá umsitingini**
Jógvan Sørin Hansen, skúlaleiðari á kvøldskúlanum, er komin við sínum viðmerkingum til málið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Onki at viðmerkja.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Onki at viðmerkja.

**Umhvørvisárin**
Onki at viðmerkja.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki at viðmerkja.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1155<br>Formansins merki: |

**Skjøl**
Uppskot til endurskoðaða lóg er hjálagt.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja við støði í eftirmetingini at heita á Kommunufelagið um at fara í samskifti við landsstýrið um at dagføra lógina um frítíðarundirvísing. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt

# 271/19 Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 309/19 | 19/04397-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 305/19 | 19/04397-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 271/19 | 19/04397-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrr í ár varð sáttmáli gjørdur við avvarðandi festara og Búnaðarstovuna um endurgjald og leigu av økið 522.000 fermetur stórt á Glyvursnesi.

Sambært sáttmálanum skulu øll arbeiðir, ið fevnd eru av endurgjaldinum so sum girðingar og nýdyrking, verða avgreidd í seinasta lagi 31. desember 2022. Festarin hevur somuleiðis fullan og óskerdan nýtslurætt til gamla seyðahúsið og maskinhøll, fram til nýggja seyðahúsið við maskinhøll er bygt, tó í seinasta lagi 31. desember 2022.

Festarin hevur longu søkt um byggiloyvi til nýtt seyðahús.

Sambært sáttmálanum § 14,2 áliggur kommununi innan trý ár frá avtaludegnum at prógva fyri Búnaðarstovuni, at arbeitt verður ítøkiliga at gjøgnumføra verkætlanina at byggja golfvøll.

Ætlanin er nú at byrja sjálvt byggimálið, ið hevur sum fortreyt, at golfvøllurin verður bygdur í stigum alt eftir fígging. Í tillagaða verkætlanaruppskotinum frá 2017 varð lagt upp til, at hvørt byggistigið fevnir um trý hol, íroknað lendisgøtur, og at mál í fyrsta umfari er at byggja golfvøll við 9 holum, sum seinni kann byggjast út til fullan vøll 18 hol.

Søkt er um at broyta byggisamtyktina fyri partin av Glyvursnesi, sum fevndur er av golfvøllinum. Hetta er við at koma undir land.

**Verkætlanartilgongd**
Ætlanin er at skipa bólk at fyrireika byggiverkætlanina við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Harumframt tilnevnir Tórshavnar Golffelag umboð í bólkin.

Ymisk stig eru í hesi fyrireikandi tilgongd.

Í fyrsta lagi er at fáa til vega projekttilfar. Í verkætlanaruppskotinum frá 2017 er lagt upp til projektering og bygging stig fyri stig yvir eitt fimm ára tíðarskeiðl. Design av golfvøllinum við lendisgøtum fyriliggur, men neyðugt at er nágreina hetta bæði viðvíkjandi lendistillagingum, nøgdum av tilfari (sand, mold v.m.), vatnleiðing, dren o.a.

Ætlan er tí at fáa í lag avtalu við golfvallararkitektin um ráðgeving at byggja golfvøll á altjóða støði á Glyvursnesi. Partur av hesum er eisini at fáa til vega útbjóðingartilfar, kostnaðarmeting av anleggsarbeiðinum og tíðarætlan fyri bygging í stigum.

Hetta tilfar er grundarlag fyri umsókn til byggimyndugleikan og friðingarmyndugleikarnar um loyvi at byggja golfvøllin við tilhoyrandi installatiónum.

Hugskot hevur verið, at kaikanturin, sum gjørdur er á Glyvursnesi í sambandi við havnaútbyggingina, kann vera verandi til við tíðini at skapa eitt maritimt umhvørvi til frítíðarafelagsskapir, ferðavinnu v.m. Tórshavnar havn er av friðingarmyndugleikunum áløgd at taka burtur kaikantin, tá liðugt er at taka grót til havnabyggingina. Verandi kaikantur er heldur ikki bygdur til at halda leingi aftrat. At tryggja kaikantin at halda fleiri ár aftrat er kostnaðarmikið.

Í sambandi við byggitilgongdina er ynski, at tilfar til golfvøllin – m.a. mongd av sandi – kann siglast og fáast uppá land um kaikantin, heldur enn at verða koyrt eftir Glyvursvegnum. Kommunan kann søkja friðingarmyndugleikarnar um at leingja loyvið til kaikantin til endamáliðj við golfvøllinum. Spurningur er eisini, um hesin flutningur kann ella skal gerast í nærmastu framtíð, áðrenn kaikanturin ikki longur er nýtiligur.

Ætlanin er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir úti á Glyvursnesi eitt nú við ymsum grassløgum og at byggja eina *putting green* upp frá grundini.

Hvussu langt hesar fyrireikingar kunnu koma, er tengt at, hvør fígging er til endamálið. Til ber at geva neyvari meting um ráðgevarakostnaðin, tá samráðing hevur verið við golfvallararkitektin. Skal sandur og annað tilfar siglast út til Glyvursnes í nærmastu framtíð, er neyðugt við fígging. At gera ymsar royndir við tilfari og grasi krevur eisini fígging.

Í 2017 varð skotið upp at byggja 9 hol yvir eitt fimm ára tíðarskeið. Mett varð, at miðalkostnaður fyri hvørt holið er kr. 3 mió, tvs. ein samlaður kostnaður uppá kr. 27 mió. Tá varð skotið upp fígging í hesum lutum:

| Ár | Tkr. | Arbeiði |
|---|---|---|
| 1 | 4.000 | Projektering og snið. Fara undir holini 1-3 |
| 2 | 5.000 | Gera holini 1-3 liðug. Projektering og snið, fara undir holini 4-6 |
| 3 | 9.000 | 3 hol klár at brúka. Gera holini 4-6 liðug. Fara undir holini 7-9. Vatngoymsla. Venjingar-/upphitingarøki |
| 4 | 6.000 | 6 hol klár at brúka. Gera holini 7-9 liðug. Leggja ætlan fyri næstu 9 holini. |
| 5 | 3.000 | 9 hol klár at brúka. |

Felagshús og maskinhøll/tilfarsgoymsla er ikki íroknað.

Umframt kommunala íløgufígging er ætlanin saman við Golffelagnum at kanna møguleikar fyri uttanhýsis fígging bæði innlendis og í altjóða golfumhvørvinum. Í løtuni er fígging á løgukontuni til golfvøllin bert til at fíggja avtalaðu endurgjaldsupphæddina kr. 9.843.016 sambært sáttmálanum um lendið. Kommunan eigur í hesum sambandi at heita á landsstýrið um at halda avtaluna, sum gjørd er um, at landið ber endurgjaldskostnaðin og kommunan byggir og fíggjar golfvøllin.

Golfvøllurin hevur týdning fyri onnur mál í økinum, eitt nú Glyvursvegurin frá Hamrinum og út á nesið. Talan er í dag um arbeiðsveg, sum einaferð skal gerast samsvarandi vegstandardi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at seta fyrireikandi verkætlanarbólk sum omanfyri lýst at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu við golfvallararkitekt at leggja aftur fyri nevnd
- at søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi til at brúka kaikantin á Glyvursnesi eftir, at havnabyggingin er liðug, til at føra sand og annað tilfar til golfvøllin
- at senda landsstýrinum áheitan um fígging til endurgjaldsupphæddina
- at játtan til bygging av golfvøllinum verður fingin til vega á íløguætlaninini, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 272/19 Ferðslutryggjan av bygdavegunum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 11.02.2016 | 25/16 | 15/00192-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 31/16 | 15/00192-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 113/16 | 15/00192-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 84/16 | 15/00192-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 09.05.2016 | 7/16 | 15/00192-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 85/16 | 15/00192-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 03.11.2016 | 106/16 | 15/00192-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 64/19 | 15/00192-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 319/19 | 15/00192-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 272/19 | 15/00192-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við at ferðslutryggja bygdavegirnar í Kollafirði, er uppskot gjørt um kantsteinsarbeiði og strikan av vegum, uppskot 15/00192-2.

**Tilmæli:**
Ferðslunevndin mælir til at taka undir við uppskoti 15/00192-2.

**Ferðslunevndin 11. februar 2016**: Samtykt at taka undir við uppskotinum. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um ætlaða arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 1 mió. kr. av íløgum fyri aðrar vegætlanir, kt. 8175, fyri 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen luttók ikki i viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 09. maj 2016:** Býarverkfrøðingurin kunnaði varð um málið.

**Ískoyti:**
Bygdavegirnir í Kollafirði frá í Líðini og fram til Norðuri í Sundum, eru nú avmerktir sum tvey minus eitt vegir, har vegurin Við Sjógv er undantikin (sí mynd j.nr. 15/00192-10).

Umsiting kommununnar hevur somuleiðis útvegað tekniskt prosjekt frá ráðgeva til dagføring av vegnum Við Sjógv (sí j. nr. 15/00192-9).

Fyri í mestan mun at tryggja gongufólk við ørindum í økinum kring Botnavegin, er gerð av gongubreytum í vestaru vegsíðu framvið vegnum Við Sjógv fyrireikað til útboð, so langt sum verandi játtan er mett at røkka.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka undir við vegføringini samsvarandi tekniska prosjektinum, at arbeiðið at gera gongubreytirnar verður boðið út og tøka játtanin verður nýtt til endamálið.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera gongubreytirnar var boðið út til seks arbeiðstakarar og komu tvey tilboð inn og vóru tey hesi:

- Fa. Poul Adrian í Homrum kr. 610.448,- uttan MVG
- P/F Tórhallur Hansen kr. 1.195.292,- uttan MVG

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting við støði í tilboðnum frá Fa. Poul Adrian í Homrum, sum vísir at útbodna arbeiðið kann gerast fyri kr. 842.321,- tá MVG, útboð, byggileiðsla, fakeftirlit, umsiting og óvæntað er íroknað (sí j.nr. 15/00192-16).

Tøka játtanin til arbeiðið er kr. 791.794,- og írestandi upphæddin er sostatt kr. 100.547,- fyri at kunna taka av tilboðnum frá Fa. Poul Adrian í Homrum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at heimila umsitingini at samráðast við Fa. Poul Adrian í Homrum um gerð av sáttmála um styttri tein av gongubreytum, soleiðis at tøka játtanin røkkur til arbeiðið.

**Tekniska nevnd 03. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið, at gera gongubreytirnar, varð handað kommununi til ásetta tíð, tann 5. mai 2017, við einum halli á kr. 25.000,-.
Arbeiðið gekk væl, men varð darvað, eisini fíggjarliga, av at arbeiðið partvís fór um ein matrikuleran tronga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At loka verkætlanina L81028, Ferðslutryggjan av bygdavegnum í Kollafirði
2. At hallið á kr. 25.000,- verður fíggjað av konto 8175, L00001 løgukarmur fyri vegir í 2019
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1161<br>Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Kunnað varð um málið.

## 273/19 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 48/17 | 17/03122-25 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 30.11.2017 | 65/17 | 17/03122-25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.12.2017 | 329/17 | 17/03122-25 |
| 4 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 318/17 | 17/03122-25 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.02.2018 | 6/18 | 17/03122-25 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 40/18 | 17/03122-25 |
| 7 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 40/18 | 17/03122-25 |
| 8 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 46/19 | 17/03122-25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 316/19 | 17/03122-25 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 273/19 | 17/03122-25 |

**Málslýsing:**
Umsitingarnar hjá IRF og Tórshavnar kommunu hava síðani tíðlíga í summar arbeitt við at kanna møguleikan fyri at samstarva um tyrvingarpláss. IRF hevur fyri stuttari tíð síðani tikið í nýtslu eitt nýtt tyrvingarpláss í Trøllavík í Suðuroy, sum IRF ætlaði at nýta til at tyrva óbrennbært burturkast, undantikið øsku, á frá øllum IRF økinum. Í fyrstu atløgu var talan um at at nýta hetta plássið til tyrviburturkast úr Tórshavn eisini, men tað varð skjótt greitt, at samlaðu nøgdirnar vórðu ov stórar til at tað loysti seg at flyta tær suður um fjørð.

IRF fór tí at kanna møguleikan fyri at leggja tyrvingarpláss norðanfjørðs. Eitt uppskot er Junkarahagan í Kvívik, har tyrvingarpláss hevur verið í mong ár, men sum er um at verða avriggað. Kommunala Brennistøðin hevur síðani verið við í tilgongdini í at kanna/fyrireika tyrvingarpláss í Kvívík. Nevnast skal, at formlig loyvi frá eigarum, kommunu og myndugleikum er ikki útvegað enn, men mett verður, at av tí at har hevur ligið eitt tyrvingarpláss í mong ár, verður lutfalsliga einfalt at fáa neyðugt loyvir á hesum stað.

Plássið skal eftir ætlan ikki nýtast til mold og annan reinan avgrevstur, tí tílíkt virksemi liggur hjá hvørjari einstakari kommunu og ikki hjá IRF. Sostatt verður framhaldandi neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at hava pláss til mold og avgrevstur, tí hetta er krav sambært lóg.

IRF hevur heitt á PB Consult um at gera tekniskar fyrireikingar, t.e. byggiprogramm, projektuppskot og kostnaðarmeting.

Seinasta kostnaðarmetingin dagfest 18/8-17 er áljóðandi 46,2 mió. Men síðani eru ymsar tillagingar gjørdar í innrættingini, sum væntandi viðføra ein minni kostnað.

Tosað hevur verið um eitt samstarvsmodell, har IRF stendur fyri at byggja og reka tyrvingarplássið, og at Tórshavnar kommuna ger nýtslu av plássinum til alt sítt tyrviburturkast, og eisini ávísir hetta tyrvingarplássið til tað vinnuliga tyrviburturkastið. Alt tyrviburturkast, sum kemur til tyrvingarplássið, verður gjaldsskyldugt, og rindað verður ein ávísur kostnaður pr. rúmmetur, soleiðis at allur íløgu- og rakstrarkostnaður verður goldin við gjøldum fyri burturkast, sum kemur til plássið. Tó verður helst eisini neyðugt, at báðir partar, t.e. IRF og Tórshavnar kommuna, veðhalda fyri hvør sínum parti av lántøkuni og rakstrinum, um tað skuldi hent, at inntøkurnar svíkja t.d. vegna fallandi nøgdir.

Sambært leysligum útrokningum kann móttøkugjaldið verða umleið 350-400 kr/$m^3$ fyri at raksturin kann javnviga. Gjaldið fyri vanligt tyrvingarburturkast er í dag 240 kr/$m^3$ í Tórshavnar kommunu.

Fyri Tórshavnar kommunu fer tað sambært leysligum útrokningum at merkja ein meirkostnað á umleið 3 mió. kr. um árið til gjøld og flutning at nýta hesa skipan við felags tyrvingarplássi saman við IRF í Kvívík, í mun til kostnaðin av verandi skipan í dag við tyrvingarplássi í Húsahaganum. Tá eru møguligar sparingar av minni virksemi í Húsahaganum innroknaðar. Fyri vinnuna verður meirkostnaðurin til gjøld og flutning samsvarandi mettur til 1 mió. kr. um árið í mun til verandi skipan í dag. Nevnast skal, at um Tórshavnar kommuna hevði valt at bygt eitt nýtt tyrvingarpláss í Tórshavnar kommunu, hevði tað eisini viðført øktar kostnaðir og gjøld, um íløgan skuldi verið afturgoldin við gjøldum fyri burturkast.

Í sambandi við samstarvið um felags tyrvingarpláss, hevur IRF spurt Kommunalu Brennistøðina, um møguleikan fyri at IRF tyrvir ilsku á tyrvingarplássinum hjá Tórshavnar kommunu í Húsahaganum frá umleið 1. oktober 2017 og fram til eitt nýtt tyrvingarpláss er klárt. IRF skal hava avriggað sítt verandi tyrvingarpláss í Oyndarfirði á heysti 2017. Tyrvingarplássið í Húsahaganum er sum kunnugt um at verða fult, men nakað av plássi er eftir til ilsku. Eisini er gjørd eitt skipanaruppskot/neyðplan (mál nr. 16/02610) fyri hvussu tyrvingin kann umskipast, um/tá verandi pláss verður fult, og er hendan ætlan góðkend av Umhvørvistovuni. Umskipanin er mett at kosta umleið 1 mió. kr. Alternativt ber til at leggja ilskuna í eina rúgvu við økið innanfyri rulluportrið, har rúgvan við reinari sølumold liggur, og síðani koyra ilskuna norð á eitt nýtt tyrvingarpláss t.d. í Kvívík, tá ið tað økið er klárt at nýta.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at

1. Tórshavnar kommuna fer í samstarv við IRF um felags tyrvingarpláss t.d. í Kvívík og at umsitingin/Kommunala Brennistøðin arbeiðir víðari við fyrireikingunum saman við IRF.
2. Tórshavnar kommuna útvegar og avsetur nýtt øki til mold og avgrevstur vestanfyri/sunnanfyri Oyggjarvegin við Kleynisvarða
3. Tórshavnar kommuna tekur ímóti ilsku frá IRF á tyrvingarplássinum í Húsahaganum sambært nærri avtalu við IRF.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Málið umrøtt og verður tikið uppaftur á næsta fundi við atliti til at fáa málið betri lýst.

**Ískoyti:**
Umsitingin arbeiðir við at fáa málið betri lýst, og verður hetta lagt fram á fundinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 30. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 14. desember 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka ikki støðu til málið á fyriliggjandi grundarlag, tí málið er ikki nóg væl lýst.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Verandi tyrvingarpláss hjá Tórshavnar kommunu er fult og tí má ein loysn finnast nú.

Játtaðar eru uml. 800.000 til at gera nakrar tillagingar á staðnum, soleiðis at tað ber til at halda fram árið út, ella eitt sindur longri. Eftir hetta skal ikki roknast við at Tórshavnar kommuna kann taka ímóti burturkasti at tyrva.

Tórshavnar kommuna og IRF arbeiða við eini ætlan um at gera eitt felags tyrvingarpláss. Eftir ætlan skal IRF byggja og reka nýggja tyrvingarplássið sum verður staðsett í Kvívík. Allar útreiðslur í sambandi við íløgur og rakstur verður goldin við móttøkugjaldi.

Móttøkugjaldið, sum verður ásett av IRF, verður væntandi 350-400 kr./m$^3$, gjaldið í Tórshavnar kommunu er í dag 240 kr./m$^{3.}$

Skal Tórshavnar kommunu sjálv byggja og reka eitt nýtt tyrvingarpláss, har íløgu- og rakstrarkostnaðurin skulu fíggjast við móttøkugjøldum, so skal roknast við, at móttøkugjaldið verður væl hægri enn tað er í dag.

Koyring av ruski er ikki partur av hesi avtalu. Tann sum kemur við ruskinum skal sjálvur gjalda fyri koyringina.

Móttøka av mold er ikki partur av hesi avtalu og tí skal Tórshavnar kommuna framhaldandi taka ímóti mold.

Fíggjarligar avleiðingar fyri Tórshavnar kommunu:
Meirkostnaðurin fyri rakstur, gjøld og flutning er mettur til umleið kr. 3,0 mió./ár fyri Tórshavnar kommunu.

IRF og Tórshavnar kommuna skulu veðhalda fyri hvør sínum parti av lántøkuni (íløgan mett til kr. 46,2 mió.) og av rakstrinum, um tað skuldi hent, at inntøkurnar svíkja t.d. vegna fallandi rusknøgdir.

Um so er at t.d. rusknøgdirnar verða minni enn væntað, soleiðis at útreiðslurnar verða størri enn inntøkurnar, so skulu IRF og Tórshavnar kommuna gjalda hvør sín part av árliga muninum av inntøkum og útreiðslunum.

Um

Fíggjarligu avleiðingar fyri vinnuna og onnur:
Í 2016 komu inn 3572 m$^3$ av vinnuburturkast til tyrvingar frá vinnuni og fyri árini 2012-2016 er talið í miðal 2468 m$^3$.

Fyri vinnuna verður meirkostnaðurin til gjøld og flutning mettur til umleið 1 mió. kr./ár, í mun til verandi skipan í dag.

Tað verður nakað meira av koyring, t.d. er úr Hoyvík 8-9 km. til verandi tyrvingarpláss í Húsahaga meðan tað er uml. 24-25 km til Kvívíkar.

Vinnan kemur framhaldandi at sleppa av við smáar nøgdir á Hjalla. Tað eru bert kundar, ið hava heilar bingjur við tyrvingartilfari, sum mugu koyra beinleiðis til tyrvingarplássið í Kvívík við bingjunum (hjáfesta excel-ark vísir útrokningar grundarlagið).

Móttøka av mold og avgrevstri:
Tórshavnar kommuna skal framhaldandi taka ímóti mold og avgrevstri (reint tilfar). Til hetta er ætlanin at nýta verandi maskinur og starvsfólk, soleiðis at raksturin verður nakað tann sami sum nú.

Verandi moldmóttøkupláss er um at verða fult og tí verður arbeitt við at finna eina nýggja staðseting til hetta. Í hesum sambandi skal roknast við at íløgur skulu gerast til nýggja plássið til m.a. vegir, hegn/portur, maskinhøll, starvsfólkarúm, innlegging av vatni, el, kloakk og líknandi.

Rottangatøming:
Sum er verður rottangaevja koyrd niðan á evjuplássið í Húsahaga, men plássið er ótíðarhóskandi og tí er neyðugt at finna eina aðra loysn.

Kommunan hevur samtykt at samstarva við IRF um viðgerð av rottangaevju í Leirvík. Nú er so ætlanin at flyta hetta til Kvívíkar, soleiðis at tað kemur at liggja saman við nýggja tyrvingarplássinum og verður tað ein stórur fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, tí hetta kemur at liggja nærri Havnini.

Tíðarætlan:
IRF hava upplýst, at teir meta, at nýggja tyrvingarplássið kann standa klárt til at taka ímóti ruski í apríl/mai 2019. Hetta er treytað av, at ein avgerð beinanvegin verður tikin um at Tórshavnar kommuna ferð í samstarv við IRF um nýggja tyrvingarplássið í Kvívík.

Ætlanaravtala:
Ætlanin er at IRF og Tórshavnar kommuna skriva undir eina ætlanaravtalu, fyri at kanna møguleikarnar til at gera og reka eitt felags tyrvingarpláss.
Tá so verkætlanin verður góðkend av báðum pørtum, verður formligur samstarvssáttmáli gjørdur.

**Tilfar til fundin:**
J.nr. 17/03122-31 Uppskot til ætlanaravtalu millum IRF og Tórshavnar,
J.nr. 17/03122-34 Leigusáttmálar millum IRF og hagapartin Norðuri í Haga
J.nr. 17/03122-35 Hagtøl fyri rusk at tyrva

**Tilmæli:**
Leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini og virkandi leiðari á Kommunalu Brennistøðini mæla til:

1. at Tórshavnar kommuna fer í samstarv við IRF um felags tyrvingarpláss t.d. í Kvívík og at kommunan arbeiðir víðari við fyrireikingunum saman við IRF.
2. at Tórshavnar kommuna skrivar undir ætlanaravtalu millum IRF og Tórshavnar kommunu, j.nr. 17/03122-31.

at Tórshavnar kommuna útvegar og avsetur nýtt øki til mold og avgrevstur vestanfyri/sunnanfyri Oyggjarvegin við Kleynisvarða.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Heðin Mortensen, tekur undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

Ískoyti:
Uppskot til avtalu um

Býráðsfundur 01. mars 2018: Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Heðin Mortensen, Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur móttikið uppskot til avtalu millum IRF og TK, um at reka eitt felags tyrvingarpláss fyri burturkast, sum skal tyrvast, umframt slaggu (øsku), harundir eisini samstarv um eina nýggja nýmótans móttøku til viðgerð av rottangaevju o.l.

Somuleiðis hevur kommunan móttikið eina kostnaðarmeting, dagfest 31.10.2019, sum ásetur lyklatøl, gjald fyri móttøku av tilfari, fíggjarætlan (budget) og útreiðslur.
Roknað verður við einum halli 2 tey fyrstu árini, sum skal deilast millum IRF og KB eftir fólkatalinum og hareftir verður mett, at skipanin hvílur í sær sjálvum.

Skjøl: j.nr. 17/03122-39 Uppskot til avtalu millum IRF og KB og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á brennistøðini mæla til, at tikið verður undir við fyriliggjandi avtalu, j.nr. 17/03122-39.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Ein meiriuti, Turið Horn, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Heðin Mortensen tekur undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Náttúru- og Umhvørvisnevndini.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 4 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson.

## 274/19 Vágsbotnur - skipan av økinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 44/18 | 18/00808-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 78/18 | 18/00808-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 58/18 | 18/00808-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.06.2019 | 127/19 | 18/00808-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 196/19 | 18/00808-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 159/19 | 18/00808-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 176/19 | 18/00808-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 180/19 | 18/00808-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 310/19 | 18/00808-1 |
| 10 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 274/19 | 18/00808-1 |

**Upprunin til málið:**
Skipan av økinum í Vágsbotni er ein liður og møgulig verkætlan í miðbýarætlanini.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Átøk eru gjørd í Vágsbotni, sum hava virkað til, at býarlívið er nógv vaksið í økinum - serliga um summarið. Trappan, søluplintar, kaféir við uttandura borðreiðing, gistingarhús, handlar og stuttleikabátar seta sín hugnaliga og maritima dám á økið. Vágsbotnur er sostatt ein sterkur miðdepil í miðbýnum, har fleiri funktiónir møtast. Men torgið og uttanum økið er í dag ikki serliga væl skipað í mun til hvørt annað og virksemið á staðnum, ferðslu, trygd v.m. og vantar ein betri skipan og heildarloysn fyri økið.

Í sambandi við at skipa økið í Vágsbotni, skal pláss vera fyri gerandisdegi og veitslu, og hevur tað týdning ikki einans at tryggja pláss til serlig tiltøk. Karmarnir til gerandislívið skulu eisini tryggjast og styrkjast.

Torgið kann skapa betri møguleikar til uttandura virksemi sum t.d. marknaðardagar, borðreiðing og spæl. Ein partur skal framvegis nýtast til bilferðslu til Skálatrøð, men ynskið er at flyta koyribreytina fyri at skapa eitt størri samanhangandi og vælvirkandi torg.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera skipanaruppskot av torginum og at íverkseta projektering til skipan av økinum, at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til fyrireikandi arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Bjørg Dam.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 28.02.2019 varð í málinum Miðbýarætlan - Steinatún, journal. nr. 14/05065, samtykt at játta 1 mió. kr av verkætlanini L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum til býartorgið í Steinatúni.

Arbeiðið at gera skipanaruppskot og at íverkseta projektering til skipan av økinum í Vágsbotni varð av tí orsøk útsett. Forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini Marin Katrina Frýdal ynskir nú at fara í holt aftur við fyrireikandi arbeiðið, men verkætlanin vantar játtanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275, L62034 Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. juni 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt skitsuuppskot til skipan av Vágsbotni. Uppskotið byggir víðari á miðbýarætlanina og tekur støði í og samantvinnar náttúru, menniskja, søgu og mentan.
Í uppskotinum, verður bryggjukanturin longdur út í sjógvin, so betri pláss er til uppihald og eisini betri pláss til fiskasølutorgið. Lagt verður upp til, at farleið hjá bilum verður einvegis, mitt eftir økinum so eitt torg verður hvørjumegin vegin, framman fyri trappuni eystanfyri og eisini á økinum vestanfyri farleiðina.

Belegningur verður ætlaður soleiðis skipaður, at tað eggjar bilum at seta ferðina niður, soleiðis at talan meira verður um eina seyrugøtu enn høvuðsfarleið.

Plantur og innbúgv eru ætlað flytilig, soleiðis at økið er hugnaligt at vera í, og so at hetta er lætt at broyta í mun til tey ymsu tiltøkini.

Skitsuætlanin sum fyriliggur, verður grundarlag undir almennari hoyring á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu, har borgarar kunnu gera viðmerkingar til ætlanina, og koma við hugskotum til Vágsbotn í framtíðini.

Innkomin hugskot verða viðgjørd og tikin við í víðari prosjekttilgongdini.
Tá hetta er gjørt, verður prosjekteringin boðin út, og prosjekteringssáttmáli við ráðgeva um skipanaruppskot og prosjektuppskot lagdur fyri nevndina aftur.

**Skjøl:**
18-00808-8 *Vágsbotnur_skipan_framløga*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at verandi skitsuuppskot verður lagt til almenna hoyring, uppskotsfasan verður boðin út, og sáttmáli við ráðgeva lagdur fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Neyðugt verður at gera forkanningar og annað í sambandi við at prosjektering verður boðin út.
Til samlaðu ætlanina fyri Vágsbotn verður neyðugt at raðfesta fíggingina at ætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at játta kr. 2.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, til verandi verkætlan L62034, Vágsbotnur - Skipan av økinum, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 3.300.000,00 av konto 6275, L00001 Løgukarminum fyri árið, og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 275/19 Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 57/19 | 18/03069-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 97/19 | 18/03069-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 149/19 | 18/03069-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 243/19 | 18/03069-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 314/19 | 18/03069-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 275/19 | 18/03069-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 11. apríl 2018 at taka undir við, at íbúðir verða bygdar á matr. nr. 43g, Argir, og at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða, sí skjal *Støðumynd*. Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum í økinum kann bygging einans verða loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Um verkætlanina sigur umsøkjarin m.a.:
- *"Grundstykkið er bratt, við einum meðalhalli á 26%. (Í meðal 12 hæddarmetrar í mun til breiddina á grundstykkinum) Hetta merkir, at um byggjast skal á skilagóðan hátt er neyðugt við alternativum loysnum til eitt nú parkering"*
- *"... Sp/f West-trading arbeitt við eini byggiætlan, har lendið verður minst møguligt ávirkað, og at allir fasilitetir, ið neyðugir eru fyri, at fólk skal trívast og støðast í slíkum íbúðarøki, eru til staðar. M.a. er ætlanin, at eitt felagshús til samkomur og aðrar aktivitetir, er partur av byggiætlanini".*

Talan er um 27 íbúðir, sum eru 93 $m^2$ hvør og hava trý kømur. Allar íbúðirnar hava egna terassu, vásarúm, úthús og privat p-pláss í parkeringskjallara. Harumframt er eitt felagsrúm, sum er 200 $m^2$ og felags terassur, sí skjøl *Flatmynd* og *Parkering*. Umsitingin metir, at talan er um eitt íbúðarsnið, sum ikki so nógv er av frammanundan, tá hugsað verður um talið av kømrum og hentleikarnir, bæði privatar og felags, sum annars eru partar av verkætlanini.

Íbúðarbygningurin er uml. 14 m høgur og er í 4 hæddum – ein parkeringskjallari og 3 hæddir við íbúðum. Stórur hæddarmunur er í økinum og uml. 20 metur eru til nærmasta granna móti sunnan, so mett verður at hettar er hóskandi í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økisásetingarnar eru:
*§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði*
1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

2. *Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein nattúrliga avmarkaðan part av tí.*
3. *Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*
4. *Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* – journal nr. 18/00909.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar ásetingar eru um mest loyvdu hædd fyri bygging í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Tó, so er vanligt at nýta ásetingina í BK17 fyri hæddarviðurskifti í mun til frástøðu frá marki, 2.2.3.2 sum sigur, at hæddin á útveggi móti grannamarki í mesta lagi má vera 2,4 x fráleikan til grannamark og gøtu.

Hendan ásetingin inniber, at bygningurin, sum er 13,8 m høgur, skal standa minst 5,75 m frá marki. Móti suðuri stendur bygningurin uml. 2,5 m frá marki. Umsøkjarin søkir tí um at keypa uml. 78 $m^2$ frá kommunu at leggja afturat ogn síni suðureftir, sí skjal *Støðumynd,* soleiðis at kravið um fráleika kann verða hildið, og er góðkenning av uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt treytað av, at umsøkjarin fær loyvi til tess.

Parkeringskjallarin er ikki taldur við í nýtslustigið, sum er uml. 0,79. Mett verður at hetta er ráðiligt, av tí at grundstykkið er bratt, og um nøktandi parkeringsviðurskifti skuldi fingist til byggingina, hevði inntrivið í umhvørvið verið munandi størri. Somuleiðis eru onnur dømir um, at kjallarahædd ikki verður tald við í nýtslustignum, t.d. serstaka byggisamtyktin fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í máli 18/00909 – *Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* hevur tekniska deild hesa viðmerkingina:

*Vatnleiðing liggur í vegnum og er hon nøktandi í mun til fyriliggjandi verkætlan.*

*Verandi kloakkleiðing í økinum, klárar ikki at taka ímóti spillvatni frá27 íbúðum og má ein loysn finnast á hesum. Tað eru í høvuðsheitum tvinnar loysnir:*

1. *Nýggj útleiðing út á streymasjógv.*
2. *Pumpuskipan, sum megnar at pumpa spillvatnið upp í leiðingina, sum kemur frá útstykkingini undir Kongavarða og liggur nakað omanfyri matr. nr. 43g.*

*Talan er um lutfalsliga kostnaðarmiklar loysnir og tað fyriliggja ikki neyv tøl júst nú.*

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt – tekstur,* journal nr. 18/03069-4.
*Framsíða suður*, journal nr. 18/03069-9.
*Parkering*, journal nr. 18/03069-9.

*Støðumynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Yvirlitskort*, journal nr. 18/03069-9.
*Flatmynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Framsíða eystur*, journal nr. 18/03069-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 43g, Argir, treytað av at umsøkjarin fær loyvi at keypa lendið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt hevur ligið til almenna hoyring, hevur kommunan móttikið 4 mótmæli.
Nógv ymisk viðurskifti verða umrødd í mótmælinum, bæði viðurskifti sum eru beinleiðis tengd at byggisamtyktini, men eisini fleiri ið hava við onnur viðurskifti at gera, so sum høvuðsvegurin út á Argjaboða, spillivatn, manglandi yvirskipað ætlan fyri Argjaboðagøtu o.a.

1. Mótmæli
   - Vegurin ov vánaligur
   - Vegurin hevur m.a. verið nýttur sum grundgeving fyri at bussurin ikki kann koyra heilt út á Argjaboða.

2. Mótmæli
   - Vánaligur vegur, í støðum bert 1 spor og eingin gongubreyt.
   - Trupulleikar av parkeringsviðurskiftum í økinum.
   - Í 50 ár hevur eingin yvirskipað ætlan verið fyri Argjaboðagøtu, og tí er hon samansett av lappaloysnum.
   - Vanligt er, at útstykkingar hava krav um 2 sporaðan veg við 2 gongubreytum. Sama krav skal setast til hesa útstykkingina.

3. 51 undirskriftir frá íbúgvum á Argjaboðagøtu, Argjavegnum og Traðagøtu
   - Vegurin ov smalur og ótíðarhóskandi at taka ímóti øktari ferðslu.

4. Mótmæli
   - Verða ávirkaði av “skyggekast”
   - Verða ávirkaði av “óhindra innlits gener”
   - At útsýnið suðureftir verður ógvusliga ávirkað
   - Ognin missur virði og at eingin taksatorvurdering
   - Eingin borgarafundur verið
   - Spillvatnið verður koyrt á sjógv miðskeiðis á matr. 43a, Argir. Eingin umhvørvisárinskanning gjørd.
   - Málið ikki verið fyri ferðslunevndini.
   - Brúgvin ov vánalig og einki vendipláss sunnast á Argjaboðagøtu
   - Nógv yvirflatuvatn, førir til svartakálk og hálku.
   - Børnini mugu ganga eftir hesum vegastrekki fyri at sleppa í skúla á Argjahamri.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Vegurin út á Argjaboða er vánaligur og eigur at verða dagførdur, áðrenn tað verður bygt meira í økinum. Eisini eigur kommunala spillvatnsskipanin at verða dagførd.

Økið er útlagt til bygging í almennu byggisamtyktini.

Um bygt verður á staðnum, so meta vit ikki at hetta kemur at ávirka grannaognina órímliga nógv viðvíkjandi skugga, innlits-gener og mistum útsýni. Um virðið á grannaognini verður størri ella minni av hesi verkætlan er trupult at meta um.

Grundað á vánaligu ferðsluviðurskiftini út á Argjaboða, eigur heildarætlan at verða gjørd fyri Argjaboða, harundir m.a. ferðsluviðurskifti og tekniskar leiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla frá at samtykkja uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt, fyrr enn ein heildarætlan fyri Argjaboða fyriliggur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:**

Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen og Halla Samuelsen, samtykkir uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt og at kommunan fær vegin út á Argjaboða dagførdan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið viðvíkjandi byggisamtyktini í býráðið og at beina málið um dagføringina av vegnum út á Argjaboða í teknisku nevnd og stovna nýtt mál hesum viðvíkjandi.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at fáa málið aftur í nevnd, ið varð einmælt samtykt.

## 276/19 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:
- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:

- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:

1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 277/19 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 804a, Tórshavn, frá A3 til A1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 184/19 | 19/04020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 277/19 | 19/04020-1 |

**Upprunin til málið:**
30. mai 2013 samtykti býráðið at broyta byggisamtyktina fyri ognina 804a frá A1 til A3, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini við Dalavegin matr. nr. 804a, Tórshavn*, soleiðis at Bústaðir kundu fara í holt við at byggja íbúðir har, sambært táverandi almennu byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu. Hendan ætlanin er síðani slept, og harvið snýr málið seg um at broyta byggisamtyktina, so at hon bæði er í tráð við núverandi almennu byggisamtykt og galdandi ætlanir fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
30. oktober 2014 varð serstøk byggisamtykt samtykt, í tráð við uppskot um at byggja 35 íbúðir á grundøkinum. Í 2016 var ætlanin slept vegna mótmælir og ivamál um hæddarviðurskiftir í mun til grannagrundøkir.

Økið varð upprunaliga broytt til A3-øki, tí at táverandi almenna byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu ikki loyvdi íbúðarbygging í A1-øki. Almenna byggisamtyktin er síðani broytt, so til ber at byggja íbúðir í A1-øki.

**Lógir, ásetingar o.a.**

§ 7. Ásetingar fyri A3 í 3. grundumráði
1 Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

2 Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

§ 5. Ásetingar fyri umráðispartarnar A1 í 3. grundumráði
1 Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

3 Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar.

9 Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir

Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyrisitingin arbeiðir við at avtaka gomlu serstøku byggisamtyktina, umframt at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri grundøkið, sum samsvarar viðkomandi skipanaruppskoti frá Búðstaðir og Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, sí mál *Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Broyting av almennu byggisamtyktini við Dalavegin matr. nr. 804a, Tórshavn, journal nr. 2013-1063
Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn, journal nr. 19/04021
Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn, journal nr. 19/04022

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Áðrenn broyting, journal nr. 19/04020-2
Aftaná broyting, journal nr. 19/04020-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at góðkenna broytingaruppskotið sambært kortskjali Aftaná broyting, journal nr. 19/04020-2, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1183 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 28. november 2019: Atkvøtt var um uppskot frá** Trónda Sigurðsson um at beina málið aftur i nevnd, ið fall við 7 atkvøðum ímóti, 5 fyri og einari blankari.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 278/19 Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 185/19 | 19/04021-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 278/19 | 19/04021-1 |

**Upprunin til málið:**
Umsitingin gjørdi saman við Bústaðir uppskot til serstaka byggisamtykt í sambandi við verkætlan um at byggja 35 íbúðir á 50 $m^2$, 75 $m^2$, 100 $m^2$ og 125 $m^2$ við Dalavegin 804a. 30. oktober 2014 tók býráðið undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanardeildini, um at broyta byggisamtyktina, sí mál *Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 804a, við Dalavegin, Tórshavn – Bústaðir*.

9. februar 2015 góðtók Fiskimálaráðið serstøku byggisamtyktina við Dalavegin 804a.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Galdandi serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 804a tekur støði í uppskotinum frá 2014, sum Arkitektar99 gjørdu í samstarv við Bústaðir. Í 2016 var ætlanin slept, vegna frávik í mun til hæddina á bygninginum, vísandi til ásetingarnar í almennu byggisamtyktini um hús við einsíðugum takhalli. Skipanaruppskot frá Bústaðir og Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, sí skjal *Skipanaruppskot A3, 18.09.2019*, lýsir verandi ætlanir, og í hesum sambandi má galdandi serstaka byggisamtykt avtakast.

**Lógir, ásetingar o.a.**
§ 7. Ásetingar fyri A3 í 3. grundumráði
1 Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.

2 Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Til tess at fyrireika matr. nr. 804a til núverandi skipanaruppskot, verður eisini farið undir at broyta økið til A1-øki í almennu byggisamtyktini, umframt at nýggj serstøk byggisamtykt verður orðað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
14/04432 Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 804a, við Dalavegin, Tórshavn – Bústaðir
14/05019 Íbúðarbygningurin Drekin á matr. nr. 804a, Dalavegur, Tórshavn
19/04020 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 804a, Tórshavn, frá A3 til A1
19/04022 Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 804a, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
DalavegurYvirlit 559237_1_1, journal nr. 14/04432-2
DalavegurSkipan 559235_1_1, journal nr. 14/04432-2
Serstøk byggisamtykt - íbúðir við Dalavegin 559236_1_1, journal nr. 14/04432-2
Skipanaruppskot A3, 18.09.2019, journal nr. 19/04022-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 804a, Tórshavn, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt**.**

| | Býráðsfundur<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1186<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 279/19 Fjarhiti til Dagstovnin á Landavegnum, matr. nr. 918b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 21/19 | 19/01620-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 135/19 | 19/01620-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 121/19 | 19/01620-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 47/19 | 19/01620-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 312/19 | 19/01620-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 279/19 | 19/01620-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina, at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í fjarhitan hjá Fjarhitafelagnum ella aðrar varandi orkukeldur. Ætlanin er at knýta Dagstovnin við Landavegin í fjarhitan, tí Fjarhitafelagið fer ígongd við at leggja leggja fjarhitaleiðingar á Landavegnum.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 425.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingir

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingir

**Umhvørvisárin**
Barnagarðurin fær grøna orku, og hetta minkar um $CO_2$ útlátið uml. 9 ferðir

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |

| Sosialar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**
Tórshavnar kommuna hevur avtalu við Magn, ið inniber at oljukostnaðurin er lægri enn fjarhitakostnaðurin í løtuni. Tað merkir, at barnagarðurin fær ein eyka kostnað fyri raksturin av fjarhitanum.
Harafturímóti verður minni viðlíkahald av hitaskipan, skorsteini og oljutanga.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
- at játta 425.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Nátturu- og umhvørisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiði at leggja fjarhita inn í Dagstovnum við Landavegin er bjóðað út, og vit fingu eitt tilboð frá MT Højgaard uppá graviarbeiðið áljóðandi 368.433,- kr. Harumframt kemur kostnaður uppá hitaverkið, ráðgeving, íbindingargjald og mvg, og samlaði kostnaður verður sostatt tilsamans 667.711,- kr.

Játtaðar eru 425.000,- kr. til hesa verkætlanina, og 33.787,- kr. eru higartil brúktar til ráðgeving. Írestandi eru 300.000,- kr.
Víst verður eisini til mál 19/01622.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:
1. at flyta 200.000,- kr. av konto 6177, L61704 Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, til konto 6177, L61702, Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin
2. at játta 100.000,- kr. av konto 6177, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6177, L61702, Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot hjá Trónda Sigurðsson um at beina málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, ið fall við 7 ímóti, 3 fyri og 3 blonkum.

Fyri atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus og Helena Dam á Neystabø.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Síðan varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

# 280/19 Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, matr. nr. 50af, Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.05.2019 | 23/19 | 19/01622-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 137/19 | 19/01622-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 123/19 | 19/01622-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 48/19 | 19/01622-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 313/19 | 19/01622-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 280/19 | 19/01622-1 |

**Upprunin til málið:**
Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Hetta er eitt átak fyri umhvørvinum í sambandi við ætlanina at minka um $CO_2$ útlátið og dálking, somuleiðis røkka málinum at knýta kommunalu bygningarnar í varandi orkukeldur.

Tað er sera umráðandi at fylgja við allari tøkniligari framgongd og kunna verða við í áhaldandi menningini innan aðrar orkukeldur.

Hettar er fyrsti bygningur hjá kommununi, sum fer at hava sólsellur á takinum, ið framleiða "Grønan" streym. Henda royndarætlan verður roynd á Dagstovninum á Velbastað, sum m.a. miðvíst er farin at arbeiða fram ímóti at verða ein grønur stovnur.
Streymurin, sum verður framleiddur, verður seldur til SEV.

Kostnaðarmetingin fyri samlaðu verkætlanina er 575.000,- kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Eingir

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Eingi

**Umhvørvisárin**
Dagstovnurin fer at framleiða grøna el orku, og hetta minkar $CO_2$ útlátið á elnýtsluni við uml. 90%.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Eingir

**Skjøl**
Skjøl við kostnaðarmeting, framleiðsla av streymi og plasering av sólsellum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

Tórshavnar kommuna ger avtalu við SEV um at selja streymin til SEV. Tað merkir, at Tórshavnar kommuna fær eina inntøku fyri sølu av streymi, sum húsaumsitingin fær ágóðan av.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til:

- at játta 575.000 kr. til hesa verkætlan av kontu 6177 Umsiting og røkt av bygningum, orkuloysn.
- at geva umsitingini heimild, at taka av tilboði og undirskriva sáttmála við arbeiðstakara.
- og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Fíggjarnevndin 15. mai 2019: Samtykt at taka undir við Náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeiðið at seta sólsellur upp á Dagstovninum á Velbastað er bjóðað út, og lægra tilboðið er áljóðandi 211.204 kr. Harumframt kemur kostnaður til ráðgeving, mvg o.a, og samlaði kostnaðurin verður sostatt tilsamans 288.155,- kr.
Játtaðar eru 575.000,- kr. til hesa verkætlan, og 62.492,- kr. eru higartil brúktar til ráðgeving o.a. Avlopið á hesi konto í mun til verandi játtan verður væntandi umleið 200.000,- kr.
Víst verður eisini til mál 19/01620.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til, at flyta 200.000,- kr. av konto 6177, L61704, Sólsellur til Dagstovnin á Velbastað, til konto 6177, L61702 Fjarhiti til Dagstovnin við Landavegin og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

# 281/19 Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 43/17 | 17/02864-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.10.2017 | 50/17 | 17/02864-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 237/17 | 17/02864-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 250/17 | 17/02864-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 281/17 | 17/02864-1 |
| 6 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 310/17 | 17/02864-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 67/19 | 17/02864-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 317/19 | 17/02864-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 281/19 | 17/02864-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur kannað møguleikar at betra um atkomuviðurskiftini millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Umsitingin hevur biðið verandi arbeiðstakara á staðnum, Articon, um tilboð at gera veg millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Umsitingin hevur verið í samráð við Articon til tess at finna sparingar á tilboðið. Tá ið sparingar eru framdar, er tilboðið frá Articon áljóðandi 880.000 kr.

Verkætlanin Skúlin á Fløtum skal burturbeina 1000 $m^3$ av mold í Húsahaga. Móttøkugaldið og burturkoyringin kostar 120.000 kr. Ístaðin fyri at beina moldina burtur í Húsahaga, er møguleiki at spara móttøkugjald og frástøðu í burturkoyring, um moldin verður flutt rundanum vegin millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri. Møguleiki er, at verkætlanin Skúlin á Fløtum flytur 80.000 kr. til verkætlanina vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og høllina og skúlan á Argjahamri.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
880.000 kr. til samans.

Sum liður í eini framtíðar ætlan boðar Fjarhitafelagið frá, at tey hava ynski um at leggja fjarhitarør í vegin millum útstykkingina á Klingrutjørn og ítróttarhøllina á Argjahamri til tess at koma yvirum Tvættá á bíligasta hátt. Fjarhitafelagið stendur sjálvt fyri at gera og gjalda hetta arbeiðið, um tikið verður av tilboðnum hjá Articon, og arbeiðið sett í gongd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum hjá Articon á 880.000 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 800.000 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 880.000,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur aftur verið í samráð við Articon til tess at fáa gøtuljós við í tilboðið, sí tilboð og málslýsing. Endaliga tilboðið frá Articon er áljóðandi 992.360 kr. Articon vátta, at tilboðið er fastur prísur og at teir standa við, at nøgdirnar í tilboðnum eru í lagi.

Møguleiki er at fíggja verkætlanina á hendan hátt:
912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700)
80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum
992.360 kr. til samans.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka av tilboðnum hjá Articon á 992.360 kr. og seta arbeiðið hjá Articon og Fjarhitafelagnum í gongd og játta 912.360 kr. av konto 8175 íløgur fyri vegir, prosjekt konto L81024, Umskipan av gamla Velbastaðvegnum (2002-2700), 80.000 kr. av konto 4176 (prosjekt konto L41012) Skúlanum á Fløtum, á tils. 992.360,- kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Endaliga úrslitið er hall á verkætlanini á kr. 74.000,00. Orsøkin, at verkætlanin hevur hall, er, at meirvirðisgjaldið ikki varð íroknað í upprunaligu kostnaðarmetingini í verkætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At loka verkætlanina L81031, Nýggjur vegur millum útstykkingina við Klingrutjørn og høllina á SAH
2. At hallið á kr. 74.000,- verður fíggjað av konto 8175, L00001 løgukarmur fyri vegir í 2019
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1193 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Kunnað varð um málið.

## 282/19 Fríøkið við Myllutjørn - Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 238/15 | 14/01477-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 50/16 | 14/01477-5 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.10.2016 | 271/16 | 14/01477-5 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 373/16 | 14/01477-5 |
| 5 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 300/16 | 14/01477-5 |
| 6 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 336/16 | 14/01477-5 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 179/19 | 14/01477-5 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 318/19 | 14/01477-5 |
| 9 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 282/19 | 14/01477-5 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við skipanin av Karlamagnusarbreyt, varð økið sett av til eitt alment fríøki mitt í býarpartinum. Ætlanin var at økið skuldi brúkast til ymisk felags tiltøk í býarpartinum og skapa samband til býlingarnar í økinum. Meðan Karlamanusarbreyt og Myllutjørn vórðu bygd, varð økið brúkt til tilfarsgoymslu.

Umsitingin hevur gjørt uppskot um at skipa og fríðka økið. Endamálið er at gera eitt felags fríøki fyri allan býarpartin, sum knýtir Karlamagnusarbreyt saman við Dalinum Langa og býlingunum í grannalagnum. Sí 14/01477-6 skjal 1 og 2).Økið verður skipað við:

1. Atkomupláss
2. Felags pláss beint við Karlamagnusarbreyt til almenn tiltøk, jólatræ v.m.
3. Almenningur. Grasað øki til frítt spæl og uppihald.
4. Myllutjørn. Tjørnin verður skipað við 0,5 m dýpi, laðaðir kantar fram við pørtum av tjarnarbakkanum.
5. Skreiðibreyt.
6. Lívdarplanting.
7. Gøtusamband til Dalin Langa og býlingarnar Myllutjørn og Hoyvíkshagi Suður.

Í fyrsta umfari verður verandi tilfar á staðnum grovplanerað og bleytbotnurin av Myllutjørn verður skiftur út við fast tilfar. Gøturnar verða skipaðar, og mold til gras- og plantuøkir verður útvegað. Síðani verður gjørt kostnaðarmeting av liðugtgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at raðfesta 500.000,- kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til skipan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tilboð á skipan av fríøki við Karlamagnusarbreyt eru innkomin. Talan er um, at í fyrsta umfari verður verandi tilfar á staðnum grovplanerað og bleyti botnurin av Myllutjørn verður skiftur út við fast tilfar.

Tilboðini eru áljóðandi:
Sp/f Við Sjógv kr. 550.000 uttan mvg.

Sp/f Maskinkoyring: kr. 839.300 uttan mvg.

Samlaða kostnaðarmetingin er til samans 660.000, um tikið verður av lægra tilboðnum:

| | | |
|---|---|---|
| HVÙ | kr. | 550.000 |
| Mvg (6,25%) | kr. | 34.375 |
| Prosjektumsiting (3%) | kr. | 16.500 |
| Ókent (10%) | kr. | 55.000 |
| Tilsamans | kr. | 655.875 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum og at játta samlaða kostnaðin á 660.000,- kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til skipan av økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sp/f Við Sjógv og Sp/f Maskinkoyring geva tilboð uppá fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig, tann 26. oktobur 2016. Talan er um tilboð á skipan av fríøkinum, parkeringspláss og gøtur, sambært viðheftu skitsutekningum.

Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 28. oktobur 2016.

**Tilmæli:**
Samlað kostnaðarmeting og tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Tilboð á fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig eru innkomin.

Tilboðini eru áljóðandi:
Sp/f Við Sjógv 3.004.000,00 kr. uttan mvg.

Sp/f Maskinkoyring 3.002.500,00 kr. uttan mvg.

Umsitingin hevur gjørt sparingar á tilboðið. Parkeringsplássið er tikið úr tilboðnum. Samlaða kostnaðarmetingin er til samans 2.991.900,00 kr. við mvg. um tikið verður av lægra tilboðnum, sí viðheftu kostnaðarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av lægsta tilboðnum og at játta samlaða kostnaðin á 2.991.900,00 kr. av konto 6210, Fríðkan av býnum, til fríøki við Karlamagnusarbreyt, 2. Byggistig.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 2.991.900 av konto 6210, fríðkan av býnum, á konto 6275 og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin er liðug og gjørd upp. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Parkeringpláss er gjørt afturat á fríøkinum. Endaliga úrslitið er hall á verkætlanini á kr. 9.000,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðararnir á býarskipanardeildini og verkætlanardeildini mæla til:
1. At loka verkætlanina L62030, Fríøkið við Myllutjørn - Karlamagnusarbreyt
2. At hallið á kr. 9.000,- verður fíggjað av konto 6275, L00001 løgukarmur fyri árið
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Kunnað varð um málið.

| | Býráðsfundur<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1197<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 283/19 Eykajáttan - umraðfestingar 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 329/19 | 19/04680-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 283/19 | 19/04680-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 19/04680-1 |

**Upprunin til málið:**
Eykajáttan krevst, um broytingar skulu gerast í samtyktu fíggjarætlanini. Eykajáttan skal vera samtykt við 2. viðgerð innan 31. desember.

Staðfest er, at fyri 2019 er avlop á nøkrum kontum og játtanartørvur á øðrum. Í hesi eykajáttan verða tí gjørdar nakrar umraðfestingar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samlaða lækkingin av rakstrarjáttanum er **3,95 mió.kr**. Tilsvarandi verður játtanin fyri 2612 Barnavernd á § 2, Almanna- og heilsumál hækkað við **3,15 mió.kr** og játtanin fyri 7476 Bátadráttur í Nólsoy við **800 tkr**.

Lækkingin á 3,95 mió.kr býtir seg soleiðis:

| | |
|---|---|
| § 1: Kommunal fyrisiting | 1,00 mió.kr. |
| § 4: Undivísing | 0,45 mió.kr |
| § 5: Mentan og frítíð | 0,20 mió.kr |
| § 6: Teknisk mál | 0,40 mió.kr |
| § 7: Kommunal virki | 1,90 mió.kr |
| **Samanlagt** | **3,95 mió.kr** |

Býtt út á stovnsnummur eru lækkingarnar hesar:

| | | tkr |
|---|---|---|
| 1110 | Býráðið | 200 |
| 1310 | Býráðsskrivstova | 100 |
| 1311 | Miðfyrisiting | 100 |
| 1312 | Trivnaðarfyrisiting | 50 |
| 1313 | Tekniska fyrisiting | 100 |
| 1315 | Nevndir og ráð | 200 |
| 1317 | Heilsu- og umsorganarfyrisitingin | 50 |
| 1560 | Tænastumannaeftirlønir | 200 |
| | **Íalt §1** | **1.000** |
| | | |
| 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 400 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 50 |
| | **Íalt §4** | **450** |
| | | |
| 5210 | Tórshavnar Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | 200 |
| | **Íalt §5** | **200** |
| | | |
| 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | 200 |
| 8110 | Vegir o.a. | 200 |
| | **Íalt §6** | **400** |
| | | |
| 7310 | Vinnustrategi | 200 |
| 7312 | Vinutiltøk | 200 |
| 7315 | Kommunuætlan | 400 |
| 7476 | Smábátahavn, Álaker | 600 |
| 7610 | Parkeringsskipanin | 500 |
| | **Íalt §7** | **1.900** |
| | | |
| | **Lækkingar íalt** | **3.950** |

**Lógir, ásetingar o.a.**
N/A

**Upplýsingar frá umsitingini**
N/A

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
N/A

**Umhvørvisárin**
N/A

| | Býráðsfundur<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1199 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla til, at støða verður tikin til omanfyri standandi broytingar til eykajáttan.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Samtykt at taka undir við omanfyristandandi broytingum til eykajáttan og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1200 | Formansins merki: |

# 284/19 Eykajáttan 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 330/19 | 19/04681-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 284/19 | 19/04681-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 19/04681-1 |

**Upprunin til málið:**
Inntøkurnar í 2019 verða hægri enn mett av fyrstun tíð, og gevir hetta møguleika fyri at hækka játtanir í fíggjarætlanini fyri 2019.

Broyting av játtanunum skal gerast umvegis eykajáttan, sum vísir, hvussu ið fíggingin er sett saman. Eykajáttanir skulu vera samtyktar við 2. viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Nøkur rakstrarstøð/stovnsnummur hava tørv á meiri játtan, og verður samlaða eykajáttanin á 36,5 mió.kr, fingin til vega frá meirinntøkunum, ið síggjast niðanfyri.

| | tús.kr |
|---|---|
| Mettar meirinntøkur 2019, persónsskattur | 22.352 |
| Regulering 2018, persónsskattur | 21.888 |
| Meirinntøkur, P/f skattur 2018 | 22.130 |
| Mettar meirinntøkur, eftirlønarinngjøld | 10.000 |
| **Mett meirinntøka 2019 íalt** | **76.370** |
| Fíggjað við tøkum peningi FÆ 2019 | -23.947 |
| **Mett avlop av inntøkum 2018 íalt** | **52.423** |

Avlopið av meirinntøkunum verður nýtt til at fíggja ein part av íløgunum í 2020. Avlopið er 52,42 – 36,50 mió.kr = 15,92 mió.kr. Játtaðar verða íalt 36,5 mió.kr inn á hesar deildir/stovnsnummur:

| Deild | Heiti | Viðmerking | Upphædd | R/L |
|---|---|---|---|---|
| 2720 Heilsuhúsið | Tannlæknaútgerð | Til keyp av mobilari tannlæknaeind, sum kann brúkast á øllum røktarheimum í kommununi. | 250.000 | R |
| 2720 Heilsuhúsið | Reingerðartænasta, tilboð | Fíggjartørvurin er 1.2 mió.kr, harav 1/3, 400 tkr, verður fíggjaður við brúkaragjøldum. Nettotørvurin er 800 tkr | 1.200.000 | R |
| 2720 Heilsuhúsið | Reingerðartænasta, tilboð | | -400.000 | R |
| | | **Íalt** | **1.050.000** | |
| 2721 Røktartænastur | Hækking av normering | Tørvur er á 3 mió.kr til uppraðfestingar á røktardeildum | 3.000.000 | R |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | **Íalt** | **3.000.000** | |
| § 3 Børn og ung | Frítíðartilboð á Velbastað | Fyrireikað verður nýtt ungdómstilboð á Velbastað eftir sama leisti sum í Kaldbak og Norðasta Horni. | 500.000 | R |
| 5366 Stuðul annars | Stuðul annars | Játtanin er ætlað stuðul til skótar. | 100.000 | R |
| 5775 Ítróttaranlegg | Fyrireiking av fimleikarhøll í Kaldbak | Nú lendið til fimleikarhøll er fingið til vega, er ætlanin at byrja projektfyri-reikingarnar, í fyrsta umfari at útvega tørvs- og kravlýsing sum grundarlag fyri byggiskrá. | 400.000 | L |
| | | **Íalt** | **1.000.000** | |
| 6210 Fríðkan og viðlíkahald | Grøn øki, landskapsarkitekt, skógfriðing | Landskapsarkitektur, skógfriðing og grøn øki | 1.000.000 | R |
| 6275 Fríðkan av kommununi | Vetrarfriðing | | 500.000 | L |
| | | **Íalt** | **1.000.000** | |
| 7110 Renovatión | Brennistøðin | Gera umstøður til at útflyta rusk í 2020 | 7.000.000 | R |
| 7110 Renovatión | Brennistøðin | Útflyta uml. 1.000 tons rusk beinanvegin | 2.300.000 | R |
| 7110 Renovatión | Brennistøðin, ráðgeving til støðulýsing | Gera frágreiðing (álit), sum lýsir støðuna og útgreinar, hvørjir møguleikar eru á burturkastøkinum | 1.000.000 | R |
| 7110 Renovatión | Hækka vinnugjøld | Hækking av prísum | -850.000 | R |
| | | | **9.450.000** | |
| 7260 Stuðul til bjargingarfeløg | Báturin Tanum hjá Havnar bjargingarfelag | | 500.000 | |
| | | **Íalt** | **500.000** | |
| 8175 Vegir | Miðstaðarøkið Marknagil | Liðugtgerð av vegarbeiðinum við Skúlan av Fløtum: Janusargøta, Hans Andriasargøta og part av Marknagilsvegnum. | 20.000.000 | |
| | | **Íalt** | **20.000.000** | |
| | | | | |
| | | **Eykajáttan íalt** | **36.500.000** | |
| | | | | |

**Lógir, ásetingar o.a.**

...

**Upplýsingar frá umsitingini**

...

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
...
**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
...
**Umhvørvisárin**
...
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
...

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingarligar avleiðingar | | | | |
| Umhvørvisligar avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin mælir til, at partur av 36,5 mió.kr av meirinntøkunum fyri 2019 verða nýttar til at fíggja omanfyri standandi deildir/rakstrarstøð sum víst í talvuni omanfyri.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt var um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Uppskotið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð.

## 285/19 Fíggjarætlan 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 203/19 | 19/02369-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 09.09.2019 | 32/19 | 19/02369-1 |
| 3 Vinnunevndin | 09.09.2019 | 50/19 | 19/02369-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 46/19 | 19/02369-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 12.09.2019 | 23/19 | 19/02369-1 |
| 6 Eldranevndin | 12.09.2019 | 15/19 | 19/02369-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 239/19 | 19/02369-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 134/19 | 19/02369-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 25.09.2019 | 255/19 | 19/02369-1 |
| 10 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 217/19 | 19/02369-1 |
| 11 Vinnunevndin | 07.10.2019 | 64/19 | 19/02369-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 10.10.2019 | 30/19 | 19/02369-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 43/19 | 19/02369-1 |
| 14 Tekniska nevnd | 08.10.2019 | 57/19 | 19/02369-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 266/19 | 19/02369-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.10.2019 | 158/19 | 19/02369-1 |
| 17 Eldranevndin | 10.10.2019 | 19/19 | 19/02369-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 282/19 | 19/02369-1 |
| 19 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 257/19 | 19/02369-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 295/19 | 19/02369-1 |
| 21 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.11.2019 | 50/19 | 19/02369-1 |
| 22 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 74/19 | 19/02369-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | | 190/19 | 19/02369-1 |
| 24 Trivnaðarnevndin | 07.11.2019 | 36/19 | 19/02369-1 |
| 25 Eldranevndin | 07.11.2019 | 22/19 | 19/02369-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 331/19 | 19/02369-1 |
| 27 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 285/19 | 19/02369-1 |
| 28 Vinnunevndin | 02.12.2019 | 71/19 | 19/02369-1 |

**Upprunin til málið:**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarætlanin verður eftir ætlan løgd fyri fíggjarnevndina 18. september 2019 og fyri býráðið 26. september. Býráðið hevur 1. viðgerð 31. oktober og 2. viðgerð 21. november.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Við hesum leggur stjórnin fram tekniska framskriving av kørmunum fyri fíggjarætlan fyri 2020 á greinastøði fyri fíggjarnevndina at viðgera. Sí skjal teknisk framskriving og skjal Tekiskframskriving við virksemisbroytingum.

**Fortreytir fyri framskriving av fíggjarætlan 2020**
Stórur búskaparvøkstur er í landinum, og ein fesk meting av búskaparvøkstrinum sigur hann vera 3,6%. Kommunan er ein munandi partur av hesum búskaparvøkstri.

Í teknisku framskrivingini verður inntøkan frá kommunuskatti, t.e persónsskatturin og eftirlønarinngjøldum mettur at vaksa 3,5%, sum er sami vøkstur, ið landið metir. Kommunuskatturin verður mettur til 829 mió.kr við sama kommunuskattaprosentið á 19,00. Skatturin av eftirlønarinngjøldum verður mettur til 138 mió.kr.

Hóast hjólini í føroyska búskapinum mala við sera høgari ferð, og 'tíðirnar eru góðar', eigur kommunan at føra ein skynsaman fíggjarpolitikk.

Í framskrivingini er løgd inn ein miðal hækking í rakstrarkostnaðum á 1,2%, ið er hækkingin í prístalinum síðsta ári og ein miðal lønarhækking á 2,5% í mun til fíggjarætlanina fyri 2019. Inntøkur frá brúkaragjøldum og líknandi eru øktar við 2%. Samanlagt førir hettar við sær at raksturin hækkar við 15,4 mió.kr ella 2%.

Umframt hettar eru íroknaðar virksemisbroytingar, tvs hækkingar/lækkingar í sambandi við lógarkrøv, býráðssamtykir, sáttmálar og økt og minkað virksemi stavandi frá til dømis nýggjum íløgum. Sí skjal virksemisbroytingar til fíggjarætlanina.

Virksemisbroytingarnar svara í løtuni til eina hækking í rakstrarkostnaðunum á 31,8 mió.kr. ella 4,1% av vøkstri í rakstrarkostnaðunum. Við virksemisbroytingum økjast samlaðu framskrivaðu rakstrarútreiðslurnar 6,1%. Fíggjarmálaráðið mælir kommununum til at rakstrarútreiðslurnar ikki vaksa við meir enn 3,5%

Út frá omanfyri nevndu fortreytum verður úrslit av rakstri 215,7 mió.kr. og skattafíggjaði løgukarmurin 180,5 mió.kr. Við virksemisbroytingum verður úrslit av rakstri 183,9 mió.kr. og skattafíggjaði løgukarmurin umleið 149. mió.kr.

Býráðið hevur samtykt at fara undir fleiri stórar løgur samstundis. Afturat hesum koma aðrar neyðugar kostnaðarmiklar løgur. Er ætlanin at gera fleiri íløgur enn rakstraravlopið/skattafíggjaða løgukarmin, fer hetta at hava við sær ein gjaldføristørv. Hesin kann útvegast við lánsfígging, sølu av ognum og/ella tøkum peningi, um avlopið í árinum vísir seg at verða størri enn ætlað og væntað.

Býráðið ásetur skattaprosent og barnafrádrátt og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina.

**Tilmæli:**
Stjørnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til at viðgera fíggjarætlanarkarmarnar á greinastøði fyri 2020 og at beina málið í faknevndirnar. Eftir hetta fara stjórarnir við støði í viðgerðunum í faknevndunum og saman við umsitingini at gera endaligt fíggjarætlanaruppskot.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019**: Fíggjarnevndin hevur viðgjørt fíggjarætlanarkarmarnar.
Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, mælir til at vøksturin í rakstrarútreiðslununum í mesta lagi verður 3,5%.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur støðu á seinni fundi.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 09. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Vinnunevndin 09. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 12. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Eldranevndin 12. september 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Eftir at tøkniliga framskrivingin/karmarnir fyri fíggjarætlanina 2020 bleiv samtykt í Fíggjarnevndini 20. juni 2019, og kunnað varð í faknevndunum 9.-12. september um málið, hevur verið arbeitt víðari við uppskotinum til fíggjarætlanina 2020 at leggja fyri Fíggjarnevndina.

Í niðanfyri standandi uppskoti til fíggjarætlan 2020 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00%, og at barnafrádrátturin er 8.000 kr., ið er tað, sum í løtuni er galdandi. Harumframt er nú í uppskotinum tikið hædd fyri kendum framskrivingum og virksemisbroytingum.

Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2018 | Ætlan 2019 | Ætlan 2020 | Broyting 2019/2020 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 795.720 | 800.740 | 846.694 | 5,7% | *45.954* |
| 20601 | Felagsskattur | 41.888 | 30.000 | 35.000 | 16,7% | *5.000* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 2.295 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 132.134 | 133.600 | 145.397 | 8,8% | *11.797* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 38.167 | 37.616 | 35.353 | -6,0% | *-2.263* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.010.205** | **1.003.956** | **1.064.444** | **6,0%** | ***60.488*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 80.329 | 91.902 | 92.992 | 1,2% | *1.090* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 237.517 | 242.637 | 259.230 | 6,8% | *16.593* |
| §3 | Børn og ung | 173.420 | 179.729 | 190.133 | 5,8% | *10.404* |
| §4 | Undirvísing | 42.526 | 42.150 | 43.946 | 4,3% | *1.796* |
| §5 | Mentan og frítíð | 53.663 | 55.969 | 58.679 | 4,8% | *2.710* |
| §6 | Teknisk mál | 136.707 | 136.367 | 142.894 | 4,8% | *6.527* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 56.738 | 68.114 | 72.885 | 7,0% | *4.771* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.409 | -38.210 | -36.318 | -5,0% | *1.892* |
| | **Rakstur íalt** | **739.492** | **778.658** | **824.441** | **5,9%** | ***45.783*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.281 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.098 | 2.500 | 2.500 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **19.379** | **20.500** | **20.500** | **0,0%** | ***0*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **251.334** | **204.798** | **219.503** | **7,2%** | ***14.705*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 4.103 | 700 | 1.200 | 71,4% | *500* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.160 | 5.500 | 6,6% | *340* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 0 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| | **Rentur íalt** | **4.103** | **5.860** | **6.700** | **14,3%** | ***840*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **247.231** | **198.938** | **212.803** | **7,0%** | **13.865** |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir** | **46.456** | **13.134** | **19.607** | 49,3% | *6.473* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **200.775** | **185.804** | **193.196** | **4,0%** | **7.392** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **159.366** | **164.654** | **180.751** | **9,8%** | **16.097** |
| | | | | | | |

* Avlop uttan Tórshavnar Havn

Kommunuskatturin er framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í 2019. Harumframt er roknað við einum vøkstri í skattagrundarlagnum á 3,00%. Kommunuskattainntøkurnar vaksa tá 5,7% ella 46 mió.kr upp í 847 mió.kr í mun til 801 mió.kr í fíggjarætlanini 2019.

Skattainntøkurnar av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru mettar til 145 mió.kr sbrt upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum. Felagsskatturin er mettur til 35 mió.kr.

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununi vaksa sostatt 61 mió.kr ella 6,0% upp í 1.064 mió.kr í mun til 1.004 mió.kr í fíggjarætlanini 2019.

Kommunan er í stórum vøkstri, og hevur hetta við sær nógv økt virksemi og tænastur og harav eisini øktar rakstrarútreiðslur. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar vaksa 46 mió.kr úr 779 mió.kr upp í 824 mió.kr, sum er ein vøkstur á 5,9% í mun til fíggjarætlanina 2019.

Hædd er tikið fyri broyttum lógarkrøvum, býráðssamtyktum íroknað virksemisbroytingum sum fylgja av nýggjum íløgum, sáttmálabroytingum og líknandi.

Fólkavøksturin hevur týðandi ávirkan á rakstrararútreiðslurnar, og gongdin í fólkatalinum ávirkar bæði inntøkur og útreiðslur.

**§ 1 Kommunual fyrisiting**: Nettoútreiðslurnar økjast við 1,2% ella 1,1 mió.kr. Serliga er talan um sáttmálabundnar lønarhækkingar. Játtanin til Teknisku fyrisiting lækkar orsakað av, at nýggj rakstrardeild er sett á stovn á §6 Teknisk mál, sum hækkkar tilsvarandi.

**§ 2 Almanna- og heilsumál**: Nettoútreiðslurnar økjast við 6,8% ella 16,6 mió.kr.

Røktartænasturnar økjast 6,2 mió.kr, og øking er í Tilboð til eldri á 1,5 mió.kr, har ið talan er um lønarútreiðslur á nýggja Umlættingar- og rehabiliteringsstovninum, sum er i gerð í Hoyvík og eisini Tjarnargarð. Ein øking er í útreiðslunum til nýggja kt-skipan til Heilsuhúsið á 1,3 mió.kr.

Útreiðslur til barnavernd økjast 1,1 mió. kr, og útreiðslur til børn sett heiman í fosturfamilju 2 mió. kr. Við verandi børnum í skipanini økjast brúkaragjøld til serstovnar við einari knappari mió.

Kommunulæknasetan og leiga av læknahúsum økir hesa útreiðslu 1 mió.kr.

**§ 3 Børn og ung:** Nettoútreiðslurnar fylgja í høvuðsheitum barnatalinum, og økjast útreiðslurnar 5,8% ella 10,4 mió.kr. Framroknaða talið av børnum á ansingarstovni økist við 75. Útreiðslur til systkinaavsláttur vaksa 1,5 mió.kr.

**§ 4 Undirvísing:** Nettútreiðslurnar hækka 4,3%, ið er 1,8 mió. Játtanin fylgir metta næmingatalinum. Størsti vøksturin er í samband við nýggja Skúlan á Fløtum.

**§ 5 Mentan og frítíð:** Nettoútreiðslurnar hækka 4,8% svarandi til 2,7 mió.kr. Av hesum er øking í lønum vegna økt virksemi 1,7 mió.kr. Hædd er tikið fyri, at nýggi Musikkskúlin er nú latin upp. og øktum virksemi á Býarsavninum.

**§ 6 Teknisk mál:** Nettoútreiðslurnar økjast við 4,8% ella 6,5 mió.kr. Av hesum eru lønir 4,6 mió.kr í samband við økt virksemi. Fleiri fermetrar av bygningum eru at viðlíkahalda, eisini er øktur rakstur í sambandi við kirkjugarðarnar. Sett er á stovn nýggj rakstrareind, ið burturav skal taka sær av viðlíkahaldi av undirstøðukervinum í kommununi.

**§ 7 Kommunal virkir**: Nettoútreiðslurnar økjast við 7,0%, sum er 4,8 mió.kr. Meirkoyring hjá Bussleiðini kostar 4,5 mió.kr.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 219,5 mió.kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir verður 212,8 mió.kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 180,8 mió.kr.

Munurin ímillum avlopið til skattafíggjaðar íløgur og samlaðar íløgur hægri enn hetta, má fíggjast við meiri inntøku, tøkum peningi og/ella lántøku.

Framskrivaðar inntøkur fyri 2019 vísa, at inntøkurnar verða hægri enn mett. Ætlanin er eisini at fíggja íløgur í 2020 við hesum inntøkum.

**Tilmæli:**

Sambært Kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri Býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir Fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 25. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Framlagt.

**Ískoyti og tilmæli til náttúru- og umhvørvisnevndina:**
Átrokandi viðurskifti á náttúru- og umhvørvisøkinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

Teknisk fyrisiting, konto 1313
Neyðug fígging: 600 tkr. í 2020
Fyrisitingarligu uppgávurnar hjá deildini eru seinastu árini blivnar fleiri, í takt við at fleiri lógir og kunngerðir eru komnar á umhvørvisøkinum.
Somuleiðis hevur Tórshavnar kommuna samtykt ein umhvørvispolitikk (Grøna Leiðin) – í 2016, sum umhvørvisdeildin varðar av at føra út í verki.
Í løtuni eru ov fá starvsfólk á deildini til at fevna um tær fyrisitingarligu arbeiðsuppgávurnar, fremja tiltøk og íverkseta verkætlanir/átøk, sum taka støði í umhvørvispolitikkinum. Tískil er týdningarmikið at fáa eina normering afturat til umhvørvisdeildina.

Umhvørvistiltøk o.a., konto 6610
Neyðug fígging: 13,5 mió. í 2020
Tórshavnar kommuna hevur samtykt yvirlýsing um veðurlagsbroytingar ísv. COP21, har kommunan vil ganga á odda ímóti veðurlagsbroytingunum og skerja útlátið av vakstrarhúsgassum.
Tórshavnar kommuna hevur somuleiðis í umhvørvispolitikkinum (Grøna Leiðin) sett sær sum mál at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016.
Við støði í hesum bleiv avgjørt at orða ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu (Mál 17/03154). Ein arbeiðsbólkur hevur síðan fyrru helvt av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiði, t.v.s. útgreinað orkunýtsluna 2016-2018 og gjørt uppskot til hvørjar verkætlanir og/ella átøk skulu setast í verk fyri at náa hesum máli. Ein tilhoyrandi kostnaðarmeting er somuleiðis

gjørd, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til hetta, so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.
Tískil er neyðugt at játta pening til fleiri orkuverkætlanir komandi árini, um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna.

Renovatión, konto 7110
Neyðug fígging: 2,0 mió. í 2020
Virksemið í samfelagnum økist og hetta ger, at kapasiteturin á brennistøðini er um at verða náddur. Neyðugt verður tískil at arbeiða við einari loysn á hesum, og mælt verður til, at í fyrstu syftu verður peningur játtaður til at gera eina framtíðarætlan og eina tilbúgvingarætlan fyri KB.

**Ískoyti og tilmæli til teknisku nevnd:**
Átrokandi viðurskifti á tekniska økinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

Marknagil, konto 8175, L81018
Neyðug fígging: 20 mió. í 2020 og 8,2 mió. í 2021
Arbeiðið at gera vegirnar úti í Marknagili er í gongd og skal meginparturin av arbeiðinum verða liðugt, áðrenn Skúlin á Fløtum letur upp, eftir summarfrítíðina í 2020.

Karlamagnusarbreyt, konto 6475, L64015
Neyðug fígging: 10 mió. í 2020 og 10 mió. í 2021
Tørvur er at fáa gjørt arbeiðið við KMB liðugt, herundir asfalt, uppmerking, broyta útkoyringar við Bónus og Skúlan, kantsteinar, gøtur, ljós og aðrar tillagingar.

Kloakk Dalavegur konto 6875
Neyðug fígging: 3 mió. til byggistig 1 og 4,0 mió. til byggistig 2
Bústaðir skulu á vári 2020 byrja uppá íbúðir ovarlaga á Dalavegnum. Neyðugt verður at fyrireika og leggja leiðingar í hesum sambandi, umleið 550 metrar tilsamans. Ætlanin er at gera hetta í 2 byggistigum. Fyrra byggistig er niðari parturin, frá J. Paturssonar gøtu til Dungagøtu, umleið 250 metrar. Arbeiðið kann byrja eftir ólavsøku 2020, og tekur umleið 4 mánaðir.
Byggistig 2 er ovari parturin, frá Dungagøtu og niðan til útstykkingina, umleið 300 metrar.

Vatnbyrging Villingardal, konto 6775
Neyðug fígging: 1 mió. í 2020 og 10 mió. í 2021
Neyðugt verður at hækka vatnbyrgingina í Villingadali. Mett verður, at samlaði kostnaðurin er umleið 20-25 mió. Ætlanin er at seta pening av í 2020 til projektering.

Arbeiðir isv Fjarhita, konto 8110 og 6810
Neyðug fígging: 17 mió. í 2020
Í sambandi við at Fjarhitafelagið er í gongd við at leggja eina høvuðsleiðing út á Argjar, verða vegir uppgrivnir fyri at leggja fjarhitarør niður. Ein avleiðing av hesum er, at tað er neyðugt hjá kommununi at seta pening av til at umleggja og umskipa vegir, kloakkir og aðrar leiðingar. Arbeiðið verður væntandi gjørt yvir nøkur ár. Tað er trupult at siga, hvat hetta kostar kommununi, men út frá tí arbeiði, sum Fjarhitafelagið hevur gjørt, m.a. á Landavegnum, verður mett, at 17 mió. árliga er á góðari leið.

Parkering, konto 8175
Neyðug fígging: 10 mió. í 2020 og 40 mió. í 2021

Arbeitt verður við at gera parkeringstunnil við eystara havnarlag, við pláss til uml. 200 bilar. Eisini verður arbeitt við einum parkeringskjallara í sambandi við íbúðarætlan á Frúutrøð. Hesi bæði prosjektini koma at kosta tilsamans góðar 100 mió.

Bussleiðin, konto 7510
Neyðug fígging: 4,5 mió. í 2020
Ætlanin er at leingja verandi sáttmála um busskoyring í eitt ár afturat, fram til 1. apríl 2021. Í hesum tíðarskeiðinum kundi kommunan sett inn ein El-buss sum royndarkoyring, fyri at vita um el-bussar skulu takast við í komandi útbjóðing av bussleiðini.

**Ískoyti og tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Átrokandi viðurskifti á byggi- og býarskipanarøkinum, sum ikki eru tikin við í fyriliggjandi uppskoti og sum tekniski stjórin, leiðarin á býarskipanardeildini og leiðarin fyri húsaumsitingina mæla til at taka við í fíggjarætlanina fyri 2020:

Røkt og umvæling av bygningum, konto 6110
Neyðug fígging: 630 tkr. í 2020
Við fyriliggjandi játtan í 2020, er kostnaðurin 175,82 kr./kvm. uttan MVG. (2019: 173,11). Í mun til 2019, er játtanin í fyriliggjandi játtan hækkað við 575 tkr. Neyðugt er við øktari játtan, um viðlíkahaldið á bygningunum skal vera á einum nøktandi støði. Við hesari hækkan verður kostnaðurin 180 kr./kvm.
Sí hjálagt notat í málinum j.nr. 19/02369-26 Notat viðv. útrokningum hjá húsaumsitingini.

Fríðkan og viðlíkahald, konto 6210
Neyðug fígging: 4.690 tkr. í 2020
Virksemið á byggi- og býarskipandeildini økist støðugt. Fleiri gøtur eru gjørdar, fleiri øki verða plantað, til frama fyri trivnaðin í býnum. Ynski er støðugt um meira viðlíkahald og gøtur, ið nú eisini verða brúktar til súkkling, sum ger at tær javnan hava tørv á ábótum. Fleiri av spæliplássunum hava tørv á ábótum og viðlíkahaldi at tryggja at trygdin er í lagi. Mett meirjáttan til eigarafeløg 380 tkr.

Tørvur á meirjáttan til nýggjar og umvæling av verandi bóltvøllum 1.230 tkr.

Tørvur á meirjáttan til umvæling og hald av gøtuskipan 425 tkr.

Tørvur er á meirjáttan til býarskipanarligar uppgávur, laðingar av grótgarðum og aðrar uppgávur 855 tkr.

Miðalkostnaður í 2019 fyri røkt av økjum, tá ið boðið verður út er 51,6 kr./fermetur/ár. Tørvur er á meirjáttan til útbjóðing av grønum økjum uppá 1.000 tkr.

Kommunan hevur skógarfriðað m.a. Havnardal. Talan er um sáttmálabundna upphædd. Í hesum sambandi er tørvur á meirjáttan á 200 tkr.

Neyðugt verður at seta landskapsarkitekt í fyribilsstarv á býarskipanardeildini, inntil býargartnarin fer frá vegna aldur, og hareftir seta viðkomandi í fast starv sum býargartnara. Tørvur er á einari meirjáttan á 600 tkr.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum til náttúru- og umhvørvisnevndina og samstundis vísir á at neyðugt verður við eykajáttan seinni í árinum í sambandi við tyrving í Kvívík.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Vinnunevndin 07. oktober 2019:** Málið varð framlagt.

**Tekniska nevnd 08. oktober 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum til teknisku nevnd.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Trivnaðarnevndin 10. oktober 2019:** Ein minniluti, Bergun Kass og Bogi Andreasen, mæla til at hækka kontu 2460 við 400.000 til framhald av ABC-verkætlanini og at hækka kontu 2614 við kr. 400.000 til fyribyrging innan dagstovnaøkið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. oktober 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum til eldranevndina og mælir samstundis til at hækka normeringarnar til røktartænastur konta 2721 við kr. 3 mió, at økja játtan til rakstur konta 2720 við kr. 3 mió ætlað til at endurnýggja røktarsengur, innbúgv, størri køksútbúnað, kalliskipan v.m., at játta kr. 1,15 mió á kontu 2720 til reingerðartænastuna til fólkapensjónistar, so at skipanin kann halda fram, og at játta kr. 350.000 á kontu 2720 til verkætlan við føstum kommunulækna inn á røktarheim og til at keypa flytføra tannlækaútgerð til røktarheimini.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, taka undir við tilmælinum til mentamálanevndini og mælir samstundis til at konta 5310 Mentanartiltøk o.a. verðru endurskoðað viðvíkjandi endamáli og nevndarábyrgd. Harumfrat at konturnar 5312 Mentanarhølir í býnum og 5315 Finsen verða lagdar saman. Mælt verður eisini til at seta játtan av til ungdómstilboð á Velbastað á grein 3.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. oktober 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina við tí broyting, at hækka játtanina til røkt og umvæling av bygningum til 190 kr/m$^2$ svarandi til íalt kr. 31.276.323, ið er ein hækkan á kr. 2.445.323 í mun til uppskotið.

Meirilutin tekur eisini undir við náttúru- og umhvørvisnevndini um at seta kr. 13,5 mió. árliga av í sambandi við orkuloysnir .

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti og beinir málið í býráðið. Viðvíkjandi teimum broytingum, ið nevndirnar hava mælt til, verða hesar beindar aftur í nevndirnar við atliti til at finna fígging innanfyri samlaða karmin í fíggjarætlanaruppskotinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við fyriliggjandi fíggjarætlanaruppskoti.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019: Atkvøtt varð um** tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari í móti og 6 blonkum atkvøðum, og uppskotið til fíggjarætlan sostatt samtykt við 1. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. november 2019:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, vísir á at nevndin hevur ikki møguleikar at finna fígging innanfyri verandi karmar í fíggjarætlanaruppskotinum og vísir samstundis á, at støðan á Brennistøðini er átrokandi.

Ein minniluti, Bjørghild Djurhuus og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, vísir á at tað ber ikki til at finna fígging innanfyri verandi karmar í fíggjarætlanaruppskotinum og vísir samstundis á, at talan er um stórar íløgur.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Víst verður til samtyktina frá fundinum í mentamálanevndini 22. oktober 2019. Vísandi til samtyktina í málinum um Tøkar skúlabygningar er tørvur á fígging til at gera Skúlan í Kongagøtu og Argja skúla kláran til dagstovnavirksemi.

Ein minniluti, Heðin Mortensen atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 22. oktober 2019.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blank.

**Trivnaðarnevndin 07. november 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í trivnaðarnevndini 10. oktober 2019.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 07. november 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Turið Horn og Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í eldranevndini 10. oktober 2019.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan við niðanfyristandandi broytingum í rakstri og íløgum og beinir málið í býráðið til aðru viðgerð:

| Deild | Navn | Viðmerkingar | Upphædd |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | **Rakstur:** | | |
| §2-2610 | Barnaverndarnevndin | Játtan lækkað samsvarandi mettum útreiðslustøði | -40 |
| §2-2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | Játtan lækkað samsvarandi mettum útreiðslustøði | -500 |
| §2-2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | Játtan lækkað samsvarandi mettum útreiðslustøði | -200 |
| §2-2755 | Flytingar millum samstørv | Ongin leiga av plássum í øðrum kommunum | -2.000 |
| §3-3215 | Barnaansing, hægri normering | Uppnormering | 3.000 |
| §5-5312 | Leggja kontur saman | 5315 Finsen verður lagt saman við 5312 Mentanarhølir | 0 |
| §6-8210 | Gøtuljós | Íløgur í led-ljós viðførir sparing í rakstrinum | -1.000 |
| §6-8101 | Rakstrarstovnurin | Nýggjur stovnur ísv bygnaðarbroyting | 2.567 |
| §6-6710 | Vegir o.a. | Flutt til 8101 Rakstrarstovnurin | -2.567 |
| §7-7510 | Bussleiðin | Játtan lækkað samsvarandi mettum útreiðslustøði | -1.000 |
| | **Rakstur íalt** | | **-1.740** |
| | | | |
| | | | |
| | **Íløgur:** | | |
| §4-4176 | Skúlin á Fløtum | Játtanin tillagað upprunaligu kostnaðarætlanini. | -11.000 |
| §5-5775 | Langhylur | Arbeiðið uppá at byggja langhylin byrjar, harundir at taka ÍSF-húsið niður. | 4.000 |
| §5-5775 | Byrsumúli | Játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, harímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna. | 3.000 |
| §5-5775 | Golf | Farið verður undir at byggja golfvøllin á Glyvursnesi í stigum komandi árini. | 3.500 |
| §5-5775 | Vøllur í Hoyvík | Játtan til at útvega fyribils felagsumstøður og aðrar batar á kringumstøður. | 1.000 |
| §5-5775 | Tórsbreyt | Nýggj ljós. | 1.000 |
| §5-5775 | Ítróttaranlegg | Játtan til at dagføra vøllirnar í Gundadali og á Argjum í stigum at skifta grasliki og útvega ljós sambært krøvum frá FSF | 2.500 |
| §6-6275 | Fríðkan av býnum | Lendisgøtur, træplanting og gøtan kring Havnina, fiskastykkið og Bukkvald. | 5.000 |
| §6-6276 | Súkklubreytir og skýli | Seta átøk í gongd í mun til ætlanina Havnin sum súkklubýur, merking, broytingar í vegakervi og súkklutiltøk | 1.000 |
| §6-6675 | Orkupolitikkur | Átøk í sambandi við orkupolitikkin | 5.000 |
| §6-6875 | Kloakkir | Játtanin er ætlað til nýgerð og dagføring av kloakkum í miðbýnum, og til framhald av arbeiðinum sambært spillivatnsætlanini | 3.000 |
| §7-7476 | Smábátahavn í Álakeri | Játtanin fer til nýggja smábátahavn í Álakeri við 250 bátaplássum | 10.000 |
| §7-7476 | Smábátahavn | Bylgjubrótari í Kollafirði | 1.600 |
| §7-7475 | Tórshavnar Havn | Landstreymur til havnaútbyggingina | 1.700 |
| | **Íløgur íalt** | | **31.300** |
| | | | |
| | **Broyting íalt** | | **29.560** |

Inntøkurnar í 2020 eru mettar til 1.064 milliónur krónur. Hetta svarar til eina inntøkuhækking á 6%. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru 823 milliónir krónur, sum svarar til ein vøkstur á 5,6% í mun fíggjarætlanina 2019.

Samlaði íløgukarmurin er 324 milliónir krónur, harav íløgurnar hjá Tórshavnar havn verða 66,7 milliónir krónur. Kommunan hevur ikki seinastu mongu árini havt tørv á lántøku. Tørvurin á nýggjum umlættingar- og rehabiliteringsheimi hevur við sær, at neyðugt verður at

útvega heimild til at læna 57 milliónir til endamálið. Lántøkan hjá Tórshavnar havn verður 50 milliónir krónur. Góðar 22 milliónir krónur verða íalt fíggjaðar við tøkum peningi.

Kommunan rindar 19,6 milliónir krónur í avdráttum í 2020.

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | **2020** |
| --- | --- | --- | --- |
| | **Rakstraræltan** | | **Løguætlan** |
| Túsund kr. | Útreiðslur | Inntøkur | |
| **§ 1. Kommunal fyrisiting** | **92.991** | - | - |
| 11. Felagsútreiðslur | 89.460 | - | - |
| 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.531 | - | - |
| **§ 2. Almanna- og heilsumál** | **256.490** | - | **67.000** |
| 20. Heilsumál | 21.988 | - | - |
| 21. Almannamál | 234.502 | - | 67.000 |
| **§ 3. Børn og ung** | **193.133** | - | **18.200** |
| 24. Mentan | 10.159 | - | - |
| 26. Barnaansing | 182.974 | - | 18.200 |
| **§ 4. Undirvísing** | **43.946** | - | **116.000** |
| 23. Útbúgving og gransking | 43.946 | - | 116.000 |
| **§ 5. Mentan og frítíð** | **58.679** | - | **17.500** |
| 23. Útbúgving og gransking | 12.884 | - | - |
| 24. Mentan | 45.795 | - | 17.500 |
| **§ 6. Teknisk mál** | **141.894** | - | **27.300** |
| 11. Felagsútreiðslur | 66.203 | - | 11.000 |
| 24. Mentan | 4.396 | - | 4.000 |
| 30. Umhvørvi | 23.743 | - | 3.000 |
| 37. Handil og vinna annars | - | - | 5.600 |
| 38. Samferðsla og samskifti | 47.552 | - | 3.700 |
| **§ 7. Kommunal virki** | **35.567** | - | **78.300** |
| 30. Umhvørvi | 20.407 | - | - |
| 31. Tilbúgving | 10.207 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 8.400 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -3.447 | - | 78.300 |
| **Tilsamans** | **822.700** | - | **324.300** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 18.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 6.700 | - | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.500 | 1.064.444 | - |
| Tilsamans | 849.900 | 1.064.444 | 324.300 |
| Yvirskot | - | 214.544 | - |
| | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | - | **-109.756** | - |
| § 25. 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 22.363 | - |
| **Nettokassaúrslit** | - | **-87.393** | **-87.393** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 19.607 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **19.607** | **-87.393** | **-107.000** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 107.000 | - |
| Fígging íalt: | - | 107.000 | 107.000 |
| **Samanlagt** | **19.607** | **19.607** | - |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1215<br>Formansins merki: |

# Íløguætlan

| | | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | **2020** |
|---|---|---:|---:|---:|---:|---:|
| | | J | J | J | J | **F** |
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **1.000** | **1.500** | **20.000** | **28.000** | **67.000** |
| 2775 | Íbúðardepil til eldri | 1.000 | 1.500 | | | |
| 2775 | Tjarnargarður | | | 10.000 | 12.300 | 10.000 |
| 2775 | Umlættingar- og rehabilieringsdepil | | | 10.000 | 15.700 | 57.000 |
| | | | | | | |
| **§3** | **Børn og ung** | **8.750** | **0** | **1.800** | **10.000** | **18.200** |
| 3175 | Dagstovnur í Kollafirði | 8.750 | | | | |
| 3175 | Frítíðartilboð á Argjum | | | 1.800 | | |
| 3175 | Um- og nýbygging av dagstovnum | | | | 10.000 | 18.200 |
| | | | | | | |
| **§4** | **Undirvísing** | **23.000** | **42.075** | **100.000** | **90.000** | **116.000** |
| 4175 | Hoyvíkar skúli | 2.000 | | | | |
| 4176 | Skúlin á Fløtum | 21.000 | 42.075 | 100.000 | 90.000 | 116.000 |
| | | | | | | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **36.000** | **26.300** | **45.500** | **31.400** | **17.500** |
| 5175 | Musikkskúli | 10.000 | | 44.000 | 24.000 | |
| 5475 | Býarbókasavnið | 3.000 | | | | |
| 5775 | Høllin á Hálsi | 20.000 | 17.500 | | | |
| 5775 | Tórsvøllur | | 5.000 | | | |
| 5775 | Langhylur | | | | 4.400 | 4.000 |
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | 3.000 | | | | |
| 5775 | Byrsumúli/skjótibreyt | | 3.800 | | | 3.000 |
| 5775 | Golf | | | | | 3.500 |
| 5775 | Vøllur í Hoyvík | | | | | 1.000 |
| 5775 | Tórsbreyt | | | | | 1.000 |
| 5775 | Ítróttaranlegg | | | 1.500 | 3.000 | 5.000 |
| | | | | | | |
| **§6** | **Teknisk mál** | **54.800** | **15.600** | **20.500** | **26.000** | **21.700** |
| 6177 | ESCO – Orku og umhvørvistiltøk | | | 1.000 | 3.000 | |
| 6275 | Friðkan av býnum | | 1.000 | | 5.000 | 5.000 |
| 6275 | Frilendisætlan | | | 500 | | |
| 6275 | Lendisgøtur | 1.000 | | 1.000 | | |
| 6275 | Miðbýarætlan | 4.000 | | 1.500 | 4.000 | |
| 6275 | Steinatún | 4.000 | | | | |
| 6275 | Súkklugøtur og skýli | | | | | 1.000 |
| 6275 | Vetrarfriðing | | | 500 | | |
| 6475 | Byggibúning, Karlamagnussarreyt | | | | 3.000 | |
| 6575 | Kirkjugarðar | 4.000 | 2.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| 6675 | Orkupolitikkur | | | | | 5.000 |
| 6875 | Kloakkir | 6.000 | 5.000 | 10.000 | 2.000 | 3.000 |
| 6875 | Kloakk í Marknagili | 10.800 | | | | |
| 8175 | Aðrar vegaverkætlanir | 4.000 | 3.600 | 2.000 | | |
| 8175 | Parkering | | | | 5.000 | |
| 8175 | Velbastaðvegur | 2.000 | | | | |
| 8175 | Innkomuvegur | 5.000 | 4.000 | | | |
| 8175 | Landavegur | | | | | 3.700 |
| 8175 | Miðdepil Marknagil | 4.500 | | | | |
| 8175 | Klingran | 2.500 | | | | |
| 8175 | Sundsvegur dagføring | 2.000 | | | | |
| 8275 | Gøtuljós- Orkusparing og stýringar | 2.000 | | | | |
| 8375 | Rakstrargøgn | 3.000 | | | | |

| | | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | J | J | J | J | F |
| | | | | | | |
| §7 | **Kommunal virki** | **7.000** | **0** | **0** | **3.200** | **17.200** |
| 7175 | Renovatión | 5.000 | | | | |
| 7375 | Talgildu Føroyar | | | | | 5600 |
| 7476 | Smábátahavn Álakeri | | | | 1.200 | 10.000 |
| 7476 | Bylgjubrótari i Kollafirði | | | | | 1.600 |
| 7476 | Smábátahavn | 2.000 | | | 2.000 | |
| | | **130.550** | **85.475** | **187.800** | **188.600** | **257.600** |
| | | | | | | |
| 7475 | Tórshavnar havn | 200.000 | 160.000 | 10.000 | 100.000 | 63.000 |
| 7475 | Fyrireiking av landstreymi | | | | | 3.700 |
| | **Samanlagt** | **330.550** | **245.475** | **197.800** | **288.600** | **324.300** |

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti uppskotinum til fíggjarætlan.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá umboðunum fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin:

**Broytingaruppskot til Fíggjarætlan Tórshavnar Kommunu 2020**
Minnilutin Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin (Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Anfinn Brekkstein) leggja fram broytingaruppskot til fíggjarætlanina fyri Tórshavnar Kommunu 2020 við tí endamáli at fyribyrgja, at neyðugt verður við lántøku í absolutt allarbestu tíðum.

Vit meta at tað er bæði ábyrgdarleyst og óforsvarligt at hækka útreiðslurnar til at reka kommununa við 6 prosentum, og enn meira ábyrgdarleyst at hækka íløguætlanina upp í 360 milliónir.

Minnilutin mælir til at fremja broytingar í fíggjarætlanini á 60,1 millión, og á tann hátt fyribyrgja lántøku í 2020. Talan er um verkætlanir, sum tola at vera útsettar.

Harafturat skjýtur minnilutin upp at hækka játtanina til normeringar á dagstovnaøkinum við 4 milliónum, samanborið við uppskotið frá meirilutanum.

Minnilutin skjýtur upp at avgerðin um at seta í verk eindarleiðslu á dagstovnaøkinum verður broytt, so at avgerðin ikki verður sett í verk, men at meirjáttanin til eindarleiðsluna, sum meirilutin skjýtur upp, heldur verður brúkt til hægri normeringar. Á tann hátt hækkar játtanin til normeringar á dagstovnaøkinum við 9 mill. í 2020.

Og minnilutin skjýtur upp at hækka játtanina til eldraøkið við 3 milliónum, samanborið við uppskotið frá meirilutanum. Á tann hátt hækkar játtanin til heitar hendur á eldraøkinum við 6 milliónum í 2020.

Minnilutin mælir til at hækkingin til dagstovnaøkið og eldraøkið verður fíggjað við umraðafestingum í samlaða rakstrinum av Tórshavnar Kommunu.

**Broytingaruppskot minnilutans er soljóðandi:**
Dagstovnurin á Flat verður útsettur: 38 mió.

| | | |
|---|---|---|
| Landskapsarkitektur verður ikki settur: | 1 | mió. |
| KOB verður lækkað við | 7 | mió. |
| Langhylur verður lækkaður við | 4 | mió. |
| Golfvøllur verður lækkaður við | 3,5 | mió. |
| Orkupolitiskar ætlanir lækka við | 5 | mió. |
| Bylgjubrótari í Kollafirði lækkar við | 1,6 | mió. |
| Tilsamans: | -60,1 | mió. |

| | | |
|---|---|---|
| Meirnormeringar á dagstovnaøkinum | 4 | mió. |
| Meirnormeringar á eldraøkinum | 3 | mió. |
| Tilsamans: | + 7 | mió. |

Broytingaruppskotið hjá umboðunum fyri Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini og at áseta kommunuskattaprosentið til 19% og barnafrádráttin til kr. 8.000, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein.

Fíggjarætlanin er soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1218 |
| | | Formansins merki: |

## 286/19 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 17/18 | 14/03118-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 112/18 | 14/03118-2 |
| 29 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 34/18 | 14/03118-2 |
| 30 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 187/18 | 14/03118-2 |
| 31 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 150/18 | 14/03118-2 |
| 32 Tekniska nevnd | 14.08.2018 | 45/18 | 14/03118-2 |
| 33 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 235/18 | 14/03118-2 |
| 34 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 193/18 | 14/03118-2 |
| 35 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 222/18 | 14/03118-2 |
| 36 Tekniska nevnd | 10.09.2019 | 47/19 | 14/03118-2 |
| 37 Fíggjarnevndin | 30.09.2019 | 257/19 | 14/03118-2 |
| 38 Býráðsfundur | 30.09.2019 | 233/19 | 14/03118-2 |
| 39 Tekniska nevnd | 30.09.2019 | 55/19 | 14/03118-2 |
| 40 Tekniska nevnd | 05.11.2019 | 66/19 | 14/03118-2 |
| 41 Tekniska nevnd | 12.11.2019 | 75/19 | 14/03118-2 |
| 42 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 332/19 | 14/03118-2 |
| 43 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 286/19 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**

Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført

uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni.

Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.
Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.
Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**
TK j. nr. 17/01243-3 Tilboð frá Articon P/f
TK j. nr. 17/01245-1 Samlað kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.

Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum. Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin)**.**

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**

Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.
Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við atkomuviðurskifti við Glasir, er avrátt at av- og á skipan til Glasir skal skipast á teirra egna øki. Hendan ætlan ber í sær, at tal av parkeringsplássum minkar við umleið 30 plássum. Skotið verður upp at etablera tey mistu p-plássini á økinum omanfyri skúlan, (sí skitsu 01). Hettar økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Handilsskúla.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við at arbeitt verður víðari við uppskotinum og mæla til, at kommunan útvegar neyðugan part av lendinum burtur av matr. nr. 1101a.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin arbeiðir við eini endaligari parkeringsloysn sum umfatar alt økið.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá teknisku nevnd, skal umsitingin arbeiða við einari endaligari parkeringsloysn, sum umfatar alt økið burturav matr. nr. 1101a, Tórshavn, sum liggur millum bygningin hjá Handilsskúlalanum og matr. nr. 1101b, Tórshavn. Neyðugt er tískil, at hesin parturin av matr. nr. 1101a, Tórshavn, verður lagdur av til parkeringsøki allur sum hann er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við teknisku nevnd og leggja tann í ískoytinum nevnda part av matr. nr. 1101a, Tórshavn, av til parkeringsøki sum liður í einari endaligari parkeringsloysn fyri økið kring Glasir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Komið er nú somikið áleiðis, at vegamótini sunnan- og norðanfyri Handilsskúlan skulu fremjast. Glasir tekur eftir ætlan nýggja skúlan í brúk komandi skúlaár og miðað verður ímóti at vegamótini tá eru liðug. Í tí sambandi er neyðugt at fáa arbeiðið boðið út og at keypa inn ferðsluljósini til bæði vegamótini.

Projekteringin er liðug og klárt er at bjóða arbeiðið út. Sí viðhefta skjal, Planur Marknagilsvegur, j.nr. 14/03118-85.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd av omanfyri nevnda arbeiði, áljóðandi kr. 4.300.000,- Ætlanin er, at kommunan sjálv keypir inn ferðsluljósini og at sjálvt vegarbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Avsettar eru kr. 2.000.000,- til vegagerð í Marknagili í inniverandi ári. Framfluttar eru kr. 6.426.000,- frá 2017. Samlaða játtanin er sostatt kr. 8.426.000,- Av hesum skulu kr. 4.030.000,- til vegagerð fram við skúlanum á Fløtum.

Mett verður at alt arbeiðið kann fremjast fyri játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeiðið verður boðið út, og at kommunan keypir og fær til vega ferðsluljós til vegamótini.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir samtyktina í Teknisku nevnd 08.mai 2018, skuldi málið verið beint í Býráðið umvegis Fígggjarnevndina. Tað koma tað av misgávum ikki, hetta verður við hesum gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtanin á kr. 2 mió. til endamalið verður flutt av L00001 yvir á verkætlanina L81018 og málið verður beint í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sum lýst omanfyri, samtykti tekniska nevnd á fundi tann 8. mai 2018, at arbeiðið við at betra um umstøðurnar við Marknagilsvegnum skuldi bjóðast út og at keypt verða inn ferðsluljós til tey bæði vegamótini, sum hava við atkomuviðurskiftini hjá Glasi at gera.

Ferðsluljósini eru bíløgd og koma tey til landið síðst í august og verða tá eftir ætlan uppsett.

Vegaprojektið hevur verið boðið út í tveimum umførum og er lægsta tilboð 10,7 mió. kr. uttan MVG. Afturat hesum skal roknast við óvæntaðum og projekteringsútreiðslum, eins og uppsetan av ferðsluljósum. Samlað kemur hendan verkætlanin at kosta góðar 13 mió. kr.

Tøkur peningur til verkætlanina er p.t. kr. 5.392.000,-. Av hesari upphædd skulu brúkast kr. 2.787.000,- til vegarbeiði sum er ígongd og til ferðsluljósini. Eftir av játtanini eru sostatt **kr. 2.600.000,-** Sí talvu niðanfyri.

Um verkætlanin skal fremjast, krevur tað at neyðugur peningur er tøkur til endamálið. Hettar kann gerast við flyting millum konti og eini eykajáttan.

| | Upphædd |
|---|---|
| Kostnaður í alt | 13.300.000 |
| Tøk upphædd á L81018 (8175) | -2.600.000 |
| | 10.700.000 |
| Fíggjast av L00002 (8175) | -6.636.000 |
| At fíggja av konto 6175 | 4.064.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við verkætlanini, at tikið verður av tilboðnum og at peningurin til verkætlanina verður fingin til vega við at fluttar vera kr. 6.636.000 frá L00002 til L810018 og at fíggja restina, kr. 4.064.000 av konto 6175, sum ein eykajáttan.
Málið viðvíkjandi eykajáttan á kr. 4.064.000 av konto 6175 verður umvegis teknisku- og fíggjarnevnd beint í Býráðið, har tað krevur 2 viðgerðir.

**Tekniska nevnd 14. august 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum.
Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Kaj Leo Holm Johannesen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongar ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreassen, Bergun Kass og Odd Færø.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
**Verkætlanin L81018 Miðstaðarøki Marknagil er uppbýtt í niðafyri nevndu stig:**
1. Arbeiðsvegur: Hans Andriasargøta & Janusargøta (er gjørt).
2. Marknagilsvegur: Undir Gráasteini til Dánjalstrøð & Janusargøta (í gerð).
3. Hans Andriasar gøta«Kiss and ride» og P-pláss (at seta í útboð).
4. Vegur til Musikkskúlan (at seta í útboð).
5. Vegamót Landavegur, ferðsluljós (at seta í útboð).
6. Marknagilsvegur: vegamótini við Landavegin og Velbastaðvegin (bíðar).
7. Dagføring av vegi Undir Gráasteini.

Fyrsta verkætlanarstig, at gera arbeiðsvegirnar fram við nýggja Musikkskúlanum og komandi skúlanum á Fløtum, er liðugt og uppgjørt.

Annað verkætlanarstig, at breiðka og ferðslutryggja Marknagilsvegin millum vegamótini Dánjalstrøð – Janusargøta, er í gongd og er komið so væl áleiðis, at koyribreyt, ovara gongubreyt og vegjaðari eru liðug. Eftir eru at gera niðaru gongubreyt, uppstrikingar, gøtuljós v.m., og verður hetta ætlandi liðugt um hálvan januar 2020.

Byggileiðslan hevur fyrireika avtalu við arbeiðstakaran KONSAX, sum hevur støði í somu eindarprísum sum eru í verandi sáttmála, um at liðugtgera Janusargøtu. P-plássið hjá dagstovninum við Landavegin skal somuleiðis dagførast, nú innkoyringin til dagstovnin verður flutt frá Landavegnum til Hans Andriasar gøtu.

Glasir og Musikkskúlin eru tikin í nýtslu, og umráðandi er, at farið verður undir triðja verkætlanarstig, sum er at gera Hans Andriasar gøtu lidna, íroknað vegamót á Landavegnum, um henda gøta skal vera tøk, tá skúlin á Fløtum verður tikin í nýtslu á sumri 2020. Prosjekt til liðuggerð av Hans Andriasar gøtu við síðugøtu til Musikkskúlan er tøkt og klárt til útboð.

Í sambandi við ætlaða vegin, hevur umsitingin fingið í lag avtalur við ognarar fram við vegnum um útvegan av lendi fyri umleið 1. mió., um verkætlanin verður útint. Sum partur av vegaprosjektinum er ætlanin at leggja avgrevstur í ein volla fram við vestursíðuni á vegnum, við planting omaná, sum vind verja móti tráu vesturættunum (sí tekning Vegplanur við volla, j.nr. 14/03118-302).

Fimta verkætlanarstig, at gera vegamótið Landavegur – Hans Andriasar gøta, er í gerð sum partur av arbeiðinum, sum fer fram á Landavegnum.

Samlaði kostnaðurin fyri alla verkætlanina er mettur til kr. 56.842.057. Samlaða játtanin til verkætlanina higartil er kr. 25.625.000. Sostatt vanta kr. 31.217.057 til liðuggerð av verkætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:

1. At heimila umsitingini at gera avtalu við verandi arbeiðstakara KONSAX P/F um liðuggerð av Janusargøtu og at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu.
2. At biðið verður um eina eykajáttan í 2019 uppá kr. 3.100.000 av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið til verkætlanina L81018, soleiðis at verandi arbeiði kann halda fram.
3. At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting av játtan millum verkætlanir undir somu høvuðskonto, og krevur tí viðgerð í teknisku nevnd, fíggjarnevnd og eina ferð í býráðnum.
4. At heimila umsitingini at seta í útboð og gera sáttmálar um liðuggerð av niðanfyri nevndu arbeiðum í 2020:
    - Hans Andriasar gøta
    - Vegur til Musikkskúlan, aftanfyri
    - Vegamót við Landavegin
    - Útvegan av lendi Landaveg og Marknagilsveg

5. At biðið verður um kr. 20.000.000 av íløgum 2020, til liðuggerð av Hans Andriasar gøtu v.m., at gera í 2020.
6. At biðið verður um kr. 8.200.000 av íløgum 2021, til liðuggerð av vegamótunum Landavegur og Velbastaðvegur, at gera í 2021.
   At umbønirnar verða beindar í býráðið umvegis fíggjarnevnd.

**Tekniska nevnd 10. september 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við pkt. 1, 2 og 3 og at beina málið um liðuggerð av Hans Andriasar gøtu, Vegur til Musikkskúlan, Vegamót við Landavegin og Útvegan av lendi í fíggjarnevndina, at taka við í arbeiðinum at gera fíggjarætlan fyri 2020.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at fíggjaræltanin fyri 2020 ikki er endaliga viðgjørd enn. Eisini verður víst á, at tær viðmerkingar, minnilutin hevur havt, ikki eru tiknar til eftirtektar. Vit hava viðmerkt, at tað ikki er rætt at seta 6 av ljóskurvunum í heildarætlanini upp, og eisini hava vit víst á, at rættari hevði verið at gjørt eina rundkoyring á vegamótinum Dánjalstrøð/Markagilsvegur og at breiðka Marknagilsvegin enn meira, har hetta er møguligt. Eisini vísir minnilutin á, at arbeiðið er heldur ikki bjóðað út.

**Ískoyti:**
Um arbeiðið, at gera vegirnar Janusargøta og Hans Andriasar gøta, skal verða liðugt áðrenn Skúlin á Fløtum verður tikin í brúk, eftir summarfrítíðina 2020, so skal arbeiðið byrja nú beinanvegin.

<u>Janusargøta (millum Bónus og Glasir):</u>
Umsitingin hevur gjørt uppskot til avtalu millum TK og P/F Konsax, um liðuggerð av Janusargøtu, umframt at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu. Talan er um eina avtalu við somu eindarprísum sum í sáttmálanum um Marknagilsvegin. Samlaði kostnaðurin av arbeiðinum er mettur til kr. 3.000.000.

Ætlanin er at fíggja hetta av konto 8175, L00001, sum er løgukarmur fyri árið til vegir.
L81018 er løgukonto til Miðstaðarøkið við Marknagil

<u>Hans Andriasar gøta (frá Marknagilsvegnum til Landavegin):</u>
At gera Hans Andriasar gøtu lidna, verður mett at kosta kr. 17,5 mió. og tá er vegurin inn til Musikkskúlan ikki við.

Mett verður, at um arbeiðið verður boðið út beinanvegin, so eigur tað at bera til at fáa vegin lidnan, áðrenn Skúlin á Fløtum letur upp, eftir summarfrítíðina 2020.

Útbjóðingartilfar er gjørt og arbeiðið er klárt at bjóða út.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til:
1. At heimila umsitingini at gera avtalu við verandi arbeiðstakara KONSAX P/F um liðuggerð av Janusargøtu og at tillaga P-økið hjá dagstovninum við Landavegin til nýggju tilkoyringina frá Hans Andriasar gøtu.

2. At játta kr. 3.000.000 av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur, til verkætlanina L81018, soleiðis at verandi arbeiði kann halda fram.

3. At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Talan er um flyting av játtan millum verkætlanir undir somu høvuðskonto, og krevur tí viðgerð í teknisku nevnd, fíggjarnevnd og einaferð í býráðnum.

4. At heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í sambandi við liðuggerð av Hans Andriasar gøtu og vegamótið við Landavegin.

**Tekniska nevnd 30. september 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 10. september 2019.

**Fíggjarnevndin 30. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass**,** tekur undir við Teknisku nevnd og beinir málið í býráðið til eina viðgerð.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at peningurin verður tikin av játtanini til innkomuvegin.

**Býráðsfundur 30. september 2019:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot í mun til samtyktina hjá fíggjarnevndini: Mælt verður til at játta kr. 3.000.000 av konto 20910 til liðugtgerð av Janusargøtu.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið fall við trimum atkvøðum fyri, sjey ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Turið Horn.

Blankt atkvøddu: Annfinn Brekkstein.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið hjá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Turið Horn.

Ímóti atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur boðið arbeiðið út, í sambandi við liðuggerð av Hans Andriasar gøtu og vegamótið við Landavegin, til tveir arbeiðstakarar í innbodnari lisitatión.

Lisitatión verður mánadagin 4. november 2019.

Úrslitið av lisitatiónini og tilmæli verður tøkt til nevndarfundin.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Tekniska nevnd 05. november 2019:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tvey tilboð komu inn uppá útbodna arbeiðið:

- P/F Articon beyð sær til at gera arbeiðið fyri kr. 16.682.422,- uttan MVG.
- P/F KONSAX beyð sær til at gera arbeiðið fyri kr. 17.344.888,- uttan MVG.

P/F KONSAX lat inn alternativt tilboð á kr. 16.459.571,-, um kantsteinar verða tiknir úr verkætlanini og at vegjaðarin verður málaður við termoplasti í staðin.

Umsitingin metir ikki tær umleið kr. 222.851,-, sum alternativa boðið er undir lægra tilboðnum, ið er frá Articon, er nøktandi orsøk til at taka av alternativa tilboðnum, við tað at kantsteinar, umframt at beina ferðslu og vatn framvið gongubreytum, eisini er fysiskur skilnaður millum gangandi og bilferðslu.

Tilboðini eru væl hægri enn tann upphædd ið áður hevur verið mett, og eru ráðgevar kommununnar, eftir at tilboðini eru eftirkannað, komnir eftir, at eindar prísirnir fyri tilfars- og arbeiðsveitingarnar í tilboðunum ikki eru í hægra lagi, men at munandi meiri er boðið út enn tað sum framgekk av undanfarnum kostnaðarmetingum.

Tað, sum ikki er komið við í undanfarnum kostnaðarmetingum, er:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Rundkoyring, parkering (Kiss and Ride) við Skúlan | uml. | kr. | 2,0 mió. |
| At meiri arbeiðið er tikið við í.s.v. við Marknagilsvegin | uml. | kr. | 4.5 mió. |
| Busshvílipláss í Janusargøtu | uml. | kr. | 0,5 mió. |

Umsitingin hevur saman við ráðgevum kommununnar og við støði í lægra tilboðnum, ið er frá P/F Articon, mett, at samlaða arbeiðið at liðuggera Hans Andriasar gøtu, kann gerast fyri tilsamans kr. 20.9 mió., tá byggileiðsla, MVG, óvæntað, trygging og byggiharraveitingar (ferðsluljós) er íroknað (sí j.nr. 14/03118-312 Kostnaðarmeting 6. nov. 2019), og tá er busshvílipláss í Janusargøtu tikið úr arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

1. At taka av lægra tilboðnum frá Articon.
2. At gera sáttmála við Articon um arbeiðið.
3. At játta kr. 20.000.000,- íroknað MVG, byggileiðslu og annað á konto 8175, á nýggja verkætlan við navninum «Liðuggerð av Hans Andriasar gøtu».
4. At restin kr. 900.000,- verður rindað av løgujáttanini til Skúlan á Fløtum sum gjald fyri rundkoyring og P-pláss til skúlan, og um tað ikki ber til, so at finna sparingar, ella taka arbeiði burtur úr sáttmálanum.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. november 2019:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun kass, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við teknisku nevnd og mælir til, at arbeiðið verður boðið út aftur millum fleiri arbeiðstakarar.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, einari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 287/19 Orkupolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.10.2017 | 46/17 | 17/03154-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 252/17 | 17/03154-1 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2018 | 37/18 | 17/03154-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 14/19 | 17/03154-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.10.2019 | 44/19 | 17/03154-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 281/19 | 17/03154-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 333/19 | 17/03154-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 287/19 | 17/03154-1 |

**Málslýsing:**

**Uppskot til leist**
Í umhvørvispolitikkinum 'Grøna leiðin' hjá Tórshavnar kommunu eru mál ásett fyri útlát, orkunýtslu og varandi orkukeldur.

Umráðandi er at ítøkiliggera hesi mál, t.v.s. hvussu kommunan minkar um nýtsluna av fossilari orku, leggur um til varandi orku og hvørji orkusparandi átøk, ið kommunan eigur at fremja.

Ætlanin er tí at seta ein arbeiðsbólk og ein stýrisbólk til at útgreina hetta arbeiðið. Arbeiðsbólkurin ger uppskot til arbeiðssetning og tíðarætlan, sum tekur støði í teimum málum, sum eru sett í umhvørvispolitikkinum, og hvørji átøk kommunan skal seta í verk fyri at røkka tess málum innan orkuøkið.

Arbeiðsbólkurin skal viðgera einstøku málini og gera ítøkilig uppskot til átøk/tiltøk fyri hvørt einstakt mál innan orku. Hetta verður gjørt í einum breiðum samstarvi millum deildir í teknisku fyrisiting. Arbeiðsbólkurin verður mannaður við á leið 4-5 umboðum úr fyrisitingini, herímillum umboð frá húsaumsitingini, teknisku deild, býarskipanardeildini og byggi- og umhvørvisdeildini. Starvsfólk á byggi- og umhvørvisdeildini samskipar arbeiðið og er skrivari hjá bólkinum.

Aktørar og intressentar, sum eru í samfelagnum innan orku, verða eisini ein partur av arbeiðinum, og verða hesir tiknir uppá ráð og innkallaðir til fund, tá arbeiðsbólkurin hevur tørv á hesum.

Arbeiðsbólkurin hevur fundarvirksemið á leið 2-3 ferðir um mánaðin. Ávegis í arbeiðinum verða fundir við stýrisbólkin, á leið 6. hvørja viku. Stýrisbólkurin verður mannaður við trimum umboðum fyri politisku skipanina, deildarleiðara á byggi- og umhvørvisdeildini og tekniska stjóra.

Yviskipaður leistur:
1. Arbeiðs- og stýrisbólkur verður settur.
2. Arbeiðsbólkur orðar arbeiðssetning fyri orkupolitikk, ið er grundaður á mál sett í umhvørvispolitikkinum.
3. Útgreinað núverandi orkunýtslu: hagtøl, status anno 2016/2017, grønur roknskapur v.m.

4. Arbeiðsbólkur ger uppskot til raðfesting av átaksøkjum og íløgum innan orkuøkið - skjótt syftir seiðir, tað tunga takið.
5. Hitaætlan og útbygging av fjarhitakervinum í Tórshavnar kommunu – víðari leistur
6. Uppskot til orkupolitikk við átøkum verður viðgjørt í politisku nevndunum.
7. Átøk/tiltøk skulu setast í verk - ábyrgdarøki og íløgur verða heimilað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir:
1. uppskot til leist at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, sum útgreinar hvørji átøk skulu setast i verk fyri at røkka teimum málum, sum eru sett fyri orkuøkið í umhvørvispolitikkinum.
2. at beina málið í býráðið, sum tilnevnir 3 politisk umboð sambært §36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum, t.e. forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, forkvinnan í byggi- og býarskipanarnevndini og eitt umboð úr fíggjarnevndini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 05. oktober 2017:** Ein meiriluti, Turið Horn, Gunvør Balle og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum og at formaðurin í teknisku nevnd eisini verður í stýrisbólkinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir til at ein frá minnilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini eisini verður í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt og at velja Hallu Samuelsen, Turið Horn og Jákup Dam í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu byrjaði í januar 2018. Arbeiðsbólkurin hevur higartil havt sjey arbeiðsfundir, og tríggir fundir hava verið við stýrisbólkin.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum hevur higartil í størstan mun verið at gera eina støðulýsing av orkunýtsluni og $CO_2$-útlátinum hjá kommununi (2016 og 2017), ið verður útgreinað fyri hesi økir:
- bygningar
- vatnverk
- gøtuljós
- pumpuskipanir
- bilar/akfør/maskinur
- bussleiðin
- Brennistøðin
- Tórshavnar havn

Nógv arbeiði liggur aftanfyri at fáa hagtøl til vega fyri orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu. Eitt nú hevur praktikantur á teknisku deild havt nógv arbeiði við at fáa hagtøl til vega fyri bilar/akfør/maskinur og pumpuskipanir. Í verandi løtu verður ein frágreiðing skrivað um orkunýtsluna og $CO_2$-útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Skipað varð eisini fyri einum temadegi um orku tann 20. apríl. Luttakarar á degnum vóru arbeiðsbólkurin og stýrisbólkurin fyri orku í Tórshavnar kommunu, umboð frá SEV og umboð

frá Fjarhitafelagnum. Endamálið við degnum var at fáa eina lýsing av orkuøkinum, har verandi støða og framtíðarætlanir hjá øllum pørtum varð væl lýst.

Á degnum vóru áhugaverdar og upplýsandi framløgur frá øllum pørtum og mett varð, at temadagurin eydnaðist væl. Ætlanin er, at partarnir framyvir javnan møtast til arbeiðsfundir at umrøða ymiskar orkuspurningar og ætlanir á økinum.

Næsta stig í arbeiðinum hjá arbeiðsbólkinum er at útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi og at gera meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir íløgu- og rakstarkostnaður.

Somuleiðis liggur eitt umfatandi arbeiði fyri framman at menna kommunalu heimasíðuna viðvíkjandi kunning mótvegis borgaranum um orkunýtslu og orkusparing.

Yvirskipaða tíðarætlanin fyri orkupolitikkin er, at arbeiðið skal verða liðugt í februar/mars 2019.

Arbeiðsbólkurin hevur umrøtt, at neyðugt er við meiri arbeiðsorku at gera ymiskt arbeiði í sambandi við gerð av orkupolitikkinum. Tískil ynskir arbeiðsbólkurin, at lýst verður eftir fólki til verkætlanarsett starv í ½ ár at einans arbeiða við ymiskum, ið hevur við gerð av orkupolitikkinum og orkuøkinum annars í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð eisini umrøtt á fundi við stýrisbólkin tann 17. mai, og tók stýrisbólkurin undir við uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin tekur undir við, at kr. 250.000 verða játtaðar av konto 6610 til verkætlanarsett starv í ½ ár, har viðkomandi skal arbeiða við orkuspurningum og gerð av orkupolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at gera ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu, hevur fólk verið í verkætlanarsettum starvi á umhvørvisdeildini síðan 1. november 2018. Verklætlanarstarvið varð tá ásett til 6 mánaðir. Í hesi tíðini er nógv arbeiði gjørt – arbeiðsbólkurin hevur fingið góð hagtøl um orkunýtslu v.m., sum avgerðir og tilmæli kunnu byggjast á. Somuleiðis er nógv neyðug kunning fingin til vega um ymiskt innan orkuøkið í síni heild.

Tó metir arbeiðsbólkurin, at enn er týdningarmikið arbeiði at útgreina, áðrenn arbeiðsbólkurin kann koma á mál við sínum tilmælum í sambandi við ein orkupolitikk fyri Tórshavnar kommunu.

Tí ynskir arbeiðsbólkurin, at verkætlanarstarvið verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at verkætlanarstarvið í sambandi við gerð av orkupolitikki hjá Tórshavnar kommunu verður longt við tveimum mánaðum, t.v.s. fram til 30. juni 2019, og at peningur til løn í 2 mðr. verður játtaður av konto 6610.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðsbólkurin fyri orkupolitkk hevur síðan byrjanina av 2018 gjørt drúgt greiningararbeiðið viðvíkjandi orkunýtslu og $CO_2$-útláti hjá Tórshavnmar kommunu. Hetta greinaingararbeiðið er komið á mál, og hevur arbeiðsbólkurin gjørt nøkur høvuðstilmæli, sum ein almennur orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu eigur at byggja á.

Arbeiðsbólkurin hevur havt nógvar innanhýsis fundir og eisini fundir við ymsikar interessentar, m.a. SEV, Orka, Fjarhitafelagið, Tórshavnar Havn.

Ávegis í arbeiðinum hava somuleiðis verið 6 fundir við stýrisbólkin fyri orkupolitikk, har kunna hevur verið um tilgongdina og úrslit hjá arbeiðsbólkinum.

Í høvuðsheitum hevur arbeiðsbólkurin útgreinað orkunýtsluna hjá Tórshavnar kommunu fyri árini 2016 (sum er støðisár í umhvørvispolitkkkinum), 2017 og 2018. Arbeiðsbólkurin hevur gjørt orkufrágreiðingar og tilhoyrandi CO2-rokniskap fyri hesi trý árini.

Arbeiðsbólkurin hevur síðan útgreinað potentialið fyri orkusparing innan ymisku økini í kommununi, t.e. bygningar, vatnverk, pumpuskipanir, akfør/maskinur, gøtuljós, bussleiðin v.fl. Út frá hesum hevur arbeiðsbólkurin gjørt eina meting og raðfesting av ymiskum orkuátøkum og -verkætlanum, herundir eisini íløgu- og rakstrarkostnað.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á, hvussu kommunan kann gerast ein grøn kommuna og spara $CO_2$, har vit fáa mest fyri íløguna í mun til sparing í orkuútreiðslum og minking í $CO_2$. Somuleiðis er dentur lagdur á átøk, sum hava høgt signalvirði mótvegis borgaranum.

Arbeiðsbólkurin hevur serliga lagt dent á, hvussu Tórshavnar kommuna kann skerja útlátið av vakstrarhúsgassi hjá Tórshavnar kommunu við 50% í 2025 í mun til 2016, sum er mál í umhvørvispolitikkinum.

Arbeiðsbólkurin hevur gjørt ítøkilig uppskot tilhvørjar orkuverkætlanir og orkuátøk kommunan eigur at seta í verk. Í høvuðsheitum eru tilmælini frá arbeiðsbólkinum fyri tey komandi 6 árini (2020-2025):

1. at ein miðvís orkuumlegging verður framd í bygningum hjá kommununi, tvs. skifta frá olju til fjarhita, jarðhita ella hitapumpu.
2. at øll gøtuljós verða skift til LED
3. at leið 70-80 bilar hjá kommununi verða el-bilar í hesum tíðarskeiðinum.
4. at bussleiðin verður elektrifiserað.

Við hesum verkætlanum og átøkum innan orkuøkið ber til at røkka fleiri av orkumálunum í umhvørvispolitikkinum, m.a. at Tórshavnar kommuna skal skerja útlátið av vakstrarhúsgassi við 50% í 2025 í mun til 2016.

Arbeiðsbólkurin hevur fyri hvørt orkuátak gjørt eina tilhoyrandi kostnaðarmeting, sum vísur, at við eini játtan á 13,5 mió. kr. árliga til orkuátøk komandi 6 árini (2020-2025), so ber til at røkka málinum í umhvørvispolitikkinum.

Víst verður til viðheftu framløgu, sum greiðir nærri frá hesum tilmælunum, hvør $CO_2$-sparingin er, og hvør íløgukostnaðurin er fyri hvørt økið.

Fyri at síggja orð í verki, tvs. um Tórshavnar kommuna skal gerast ein grøn kommuna og liva upp til egin mál í umhvørvispolitikkinum, so er neyðugt at penningur verður játtaður á fíggjarætlanini til verkætlaninr og átøk innan orku, áðrenn Tórshavnar kommuna fer út við einum almennum orkupolitikki, sum byggir á tilmælini hjá arbeiðsbólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at nevndin samtykkir at seta í verk orkupolitikkin, soleiðis at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina og at játta 5,0 mió. í 2020 og restina javnt yvir komandi 6 árini.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. oktober 2019:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging, soleiðis at orkupolitikkurin kann setast í verk.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Samtykt at taka málið upp í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2020.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við tilmælinum hja tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1240 |
| | Formansins merki: |

# 288/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 145/19 | 19/00096-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 129/19 | 19/00096-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2019 | 204/19 | 19/00096-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 167/19 | 19/00096-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 251/19 | 19/00096-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.09.2019 | 229/19 | 19/00096-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 283/19 | 19/00096-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 258/19 | 19/00096-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 334/19 | 19/00096-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 288/19 | 19/00096-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | | | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. september 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

<table>
<tr><td rowspan="2">Býráðsfundur<br>28. november 2019</td><td>Blað nr.: 1243</td></tr>
<tr><td>Formansins merki:</td></tr>
</table>

# 289/19 Langtíðar íløguætlan 2021 til 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.11.2019 | 335/19 | 19/04709-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 289/19 | 19/04709-1 |

**Upprunin til málið:**

Arbeitt verður við eini langtíðarætlan fyri løgur fyri árini 2020- 2025, har størri verkætlanir fyri økini í kommununi verða raðfestar.

Kunnað verður um málið.
Tilfar kemur til fundin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 27. november 2019:** Kunnað varð um málið og løgd varð fram niðanfyristandandi langtíðaríløguætlan, ið eisini varð beind í býráðið til kunningar:

# Langtíðar íløguætlan 2021 - 2025

### Lýsing av málinum - samandráttur

Tað er eitt høvuðsmál at tryggja, at kommunan førir ein skynsaman fíggjarpolitikk, soleiðis at tað framhaldandi fer at ganga væl í Tórshavnar kommunu, borgarum og vinnulívinum at frama. Somuleiðis er umráðandi, at tað er øllum greitt, hvat ið skattakrónurnar verða brúktar til.

Langtíðarætlanir verða lagdar fyri løgurnar, soleiðis at hesar verða tillagaðar sveiggj í búskapinum eins væl og tørvinum fyri tey ymisku málsøkini. Eisini verður arbeitt við at tryggja, at tær verkætlanir, sum kommunan stendur fyri, altíð eru væl fyrireikaðar og hava dygdargott eftirlit.

### Langtíðarætlan fyri løgur árini 2021 - 2025

Arbeitt verður við eini langtíðarætlan fyri løgur fyri árini 2021-25, har ið størri verkætlanir fyri økini í kommununi verða raðfestar. Smærri verkætlanir verða ikki tiknar við í langtíðar íløguætlanini.

Umframt stóru útbyggingina av Tórshavnar havn raðfestir kommunan komandi árini íløgur innan hesi økir:

- Eldraøkið (Almanna og heilsumál)
- Dagstovnaøkið (Børn og ung)
- Skúlaøkið (Undirvísing)
- Mentanarøkið (Býarbókasavnið)
- Ítróttarøkið (Mentan og frítíð)
- Ferðsla, vegir, parkering, býarskipan og orka (Teknisk mál)
- Renovatión (Kommunal virki)
- Smábátahavnir (Kommunal virki)

Samanumtikið verður arbeitt við niðanfyristandandi íløgum komandi árini (í 1.000 kr.):

| Øki | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | Íalt |
|---|---:|---:|---:|---:|---:|---:|---:|
| Alm.- og heilsumál | 67.000 | 5.000 | 90.000 | 70.000 | 0 | 1.000 | 233.000 |
| Børn og ung | 18.200 | 0 | 1.000 | 8.000 | 9.000 | 0 | 36.200 |
| Undirvísing | 116.000 | 0 | 10.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 186.000 |
| Mentan og frítíð | 17.500 | 111.000 | 107.000 | 17.000 | 8.000 | 5.500 | 266.000 |
| Teknisk mál | 21.700 | 60.700 | 53.500 | 49.500 | 53.500 | 53.500 | 292.400 |
| Kommunal virki | 17.200 | 23.000 | 12.000 | 110.000 | 110.000 | 110.000 | 382.200 |
| | **257.600** | **199.700** | **273.500** | **274.500** | **200.500** | **190.000** | **1.395.800** |

Víst verður eisini til niðanfyri útgreinaðu langtíðar íløguætlan fyri árini 2020–25, har økini verða lýst meira niður á einstakar verkætlanir.

**Eldraøkið**

Eldraøkið verður raðfest høgt, har ið fleiri átøk skulu tryggja góðan aldurdóm við virðiligum loysnum. Fyrst og fremst verður orka løgd í at nøkta bráðneyðuga tørvin á ymisku økjunum. Neyðugt verður at útvega fleiri røktar- og umlættingarpláss, har ið hædd eisini verður tikin til tørvin hjá teimum eldru á ymiskum bústaðarloysnum.

Við grundarlagi í hesum verða millum annað hesar íløgur raðfestar fyri eldraøkið:

- Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil
- Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði
- Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Eldradepil í Kollafirði

Samtykt er at byggja ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil, og arbeiðið er í gongd. Á umlættingar- og rehabiliteringsdepilinum verða 27 pláss. Hesi plássini skulu nýtast til umlætting og rehabilitering alt eftir tørvinum. Á depilinum verða eisini umstøður til venjingar. Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin verður staðsettur í Hoyvík, og verður væntandi liðugur á heysti 2020.

Arbeiðið við at út- og umbyggja eldra partin av Tjarnargarði til demensdepil heldur fram. Umframt at eldri parturin av Tjarnargarði verður umvældur, fer nýggi demensdepulin at hava 10 búpláss, 7 nýggj umlættingarpláss, nýtt stórt dagtilhald og venjingarhøli til bæði fysio- og ergoterapi. Eisini verður nýggjur køkur gjørdur. Út- og umbygging av Tjarnargarði væntast at vera liðug á heysti 2020.

Arbeitt verður ítøkiliga við at gera nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Talan verður um eitt heim við 64 eindum og 16 íbúðum. Eftir ætlan fer arbeiðið í gongd í 2021, og væntast at verða liðugt í 2023.

Arbeitt verður við at gera ein eldradepil í Kollafirði. Arbeiðið fer væntandi í gongd í 2021, og verður eftir ætlan liðugt í 2022.

**Dagstovnaøkið**

Øll børn hava rætt til ein tryggan og mennandi gerandisdag. Kommunan vil gera íløgur í børnini og geva dagstovnunum betri rúmd til námsfrøðiligt innihald, trivnað og menning.

Kommunan er í vøkstri, og tørvurin á fleiri ansingarplássum er tí vaksandi. Fyrst og fremst verður orka løgd í at nøkta bráðneyðuga tørvin á barnaansingarplássum, og arbeitt verður við ymiskum loysnum at tryggja nøktandi tal av plássum.

Fylgjandi íløgur fyri dagstovnaøkið verða raðfestar komandi árini:

- Um- og útbygging av dagstovninum Vesturi á Flat
- Umbygging og dagføring av dagstovninum á Argjum

Arbeiðið við at um- og útbyggja dagstovnin Vesturi á Flat er farið í gongd, og hetta arbeiðið verður eftir ætlanin liðugt í 2020. Harumframt eru ætlanir um at dagføra dagstovnin á Argjum, og hetta arbeiðið verður eftir ætlan liðugt í 2024.

**Skúlaøkið**
Børn og ung í fólkaskúlaaldri skulu hava bestu kor, og arbeiðið við teimum stóru útbyggingunum á skúlaøkinum heldur fram, har millum annað hesar íløgur verða raðfestar komandi árini:

- Nýggjur skúli á Fløtum
- Dagføring av Hoyvíkar skúla
- Dagføring av Sankta Frans Skúla

Arbeiðið við at byggja nýggjan skúla á Fløtum heldur fram. Skúlin fer at rúma 850 næmingum, íroknað forskúla og frítíðarskúla. Skúlin hevur eisini ítróttarhøll. Skúlin verður væntandi liðugur og klárur at taka í nýtslu í 2020.

Harumframt verður komandi árini eisini raðfest at útbyggja og høvuðsumvæla skúlan í Hoyvík og Sankta Frans Skúla.

**Mentan og frítíð**
Arbeitt verður við at út- og umbyggja Býarbókasavnið. Arbeiðið fer eftir ætlan í gongd í 2021, og verður væntandi liðugt í 2023.
Ætlanin er útvega Býarsavninum høli til framsýningar v.m.

**Ítróttarøkið**
Ítróttur og rørsla hava stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi. Møguleikarnir fyri ítrótti verða áhaldandi útbygdir fyri bæði breiddina og úrvalsítrótt. Málið er, at Tórshavnar kommuna skal kunna hýsa enn fleiri altjóða kappingum í høvuðsstaðnum. Tí skulu umstøðurnar innan fleiri ítróttargreinir betrast, eitt nú innan svimjing og golf.

Kommunan vil tí komandi árini millum annað raðfesta hesar íløgur innan ítróttarøkið:

- Langhylur
- Golfvøllur
- Tórsvøllur
- Skjótibreyt
- Vøllur í Hoyvík
- Stórhøll

Arbeiðið at gera langhyl aftrat verandi svimjihøll í Gundadali er farið í gongd. Við langhylinum verður møguligt at hava fleiri svimjikappingar á altjóða støði, eins og nógv fleiri borgarar enn í dag fáa møguleika javnan at nýta allar møguleikarnar, ið ein slík munandi útbygging av svimjihøllini er. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í 2020 við tí endamáli at byrja byggingina í seinnu hálvu av 2020, harímillum at taka niður verandi ÍSF-hús, sum stendur á byggiøkinum. Byggingin ætlast liðug í 2022 treytað av løgujáttan árini 2021 og 2022.

Farið er undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi, soleiðis at møguleiki verður at halda kappingar á altjóða støði, og at enn fleiri borgarar kunnu spæla golf. Játtan er sett av til at byggja golfvøllin. Kommunan hevur nú fingið neyðugu lendisrættindini til endamálið. Ætlanin er at byggja golfvøllin í stigum soleiðis, at tað í 2023-24 ber til at spæla í golf á vølli við 9 breytum/holum. Vøllurin kann byggjast út til 18 breytir/hol.

Arbeiðið við at útbyggja Tórsvøll heldur fram, og peningur verður settur av til arbeiðið.

Betrað verður um skjótibreytina og korini hjá Byrsumúla. Játtan er sett av til at byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, frálæru og altjóða kappingar. Umframt projektering skal játtanin brúkast til lendisarbeiði, harímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna. Í 2021 er ætlanin at gera skjótibreytina lidna við tilhoyrandi bygningum, kastimaskinum og aðrari útgerð.
Játtan er sett av til at bøta um umstøðurnar kring Hoyvíksvøll. Í fyrsta umfari er ætlanin at útvega fyribils felagsumstøður við vøllin. Ætlanin er eisini at fyrireika verkætlan at byggja umklæðingarrúm, áskoðaraskýli v.m. samsvarandi krøvum frá FSF árini 2021-22.

Harumframt verður framhaldandi arbeitt við at betra um vallir ymsastaðni í kommununi við ljósviðurskiftum og øðrum. Játtan er sett av til dagføring av fótbóltsvøllunum í Gundadali og á Argjum. Dagføringin fevnir í høvuðsheitum um at skifta graslíki á Ovara vølli, Niðara vølli og Inni í Vika. Harumframt fevnir arbeiðið um at seta nýggjar ljósmastrar upp á Ovara vølli og Inni í Vika samsvarandi krøvum frá FSF. Játtanin í 2020 er fyrsta stig í tilgongd, sum ætlast skal halda fram í 2021 og 2022.

Samtykt er at fara undir fyrireikingar til eina stórhøll, ið skal vera staðsett við Stórutjørn í Hoyvík, m.a. tætt við komandi innkomuvegin til høvuðsstaðin. Ætlanin er, at stórhøllin skal kunna hýsa alskyns virksemi innan ítrótt, mentan o.a. Serliga er ætlanin at tryggja føroyskum landsliðum innan ymiskan innandura ítrótt nøktandi karmar til at uppfylla viðkomandi krøv frá evropeiskum og altjóða felagsskapum.

**Ferðsla, vegir, parkering og býarskipan**
Til framhaldandi at tryggja trivnað, ferðsluviðurskiftini og útbyggingar í kommuni verða støðugt raðfestar íløgur til fríðkan, vegastrekki og parkeringsviðurskifti o.a.
Raðfestar verða tí millum annað hesar íløgur komandi árini:

- Miðbýarætlan og fríðkan av kommununi
- Ferðsluviðurskifti og parkering
- Innkomuvegur
- Kirkjugarðar
- Kloakkir
- Vatnbyrging í Villingardali
- Orku- og umhvørvistiltøk

Arbeitt verður framhaldandi við miðbýarætlanini og fríðkan av kommununi, og peningur verður settur av til átøk og verkætlanir, harímillum planting av trøum, gerð av lendisgøtum, frílendisætlan, torgið við Vágsbotn og økið við Steinatún.

Alneyðugt er at útvega fleiri parkeringspláss í býnum. Arbeitt verður framhaldandi við at betra um ferðsluviðurskiftini í býnum, harímillum m.a. vega- og parkeringsviðurskiftini. Samstundis verður miðvíst arbeitt við at minka um bilatalið í býnum. Hetta verður millum annað gjørt við at betra um Bussleiðina, og miðað verður ímóti, at hon gerst eitt veruligt alternativ til privatbilin. Eisini verður arbeitt við at betra um steðgiplássini, bussskýlini, kunning, fleiri súkklu-/gonguleiðir og pendlarapláss.

Samstarvið við landsmyndugleikarnar um ætlanirnar at gera nýggjan innkomuveg til Havnar við nærri avtalaðum íbindingum í innkomuvegin heldur fram, soleiðis at bæði býur og ferðandi fram við býnum fáa gagn av vegnum. Farast kann undir projektering av innkomuvegnum í 2020, ið er partur av avtaluni við Samferðslumálaráðið frá 2016.

Arbeiðið við víðkanini av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin heldur fram, og verður liðugt í 2021.

Arbeiðið við kloakkum heldur fram, og peningur verður settur av til nýgerð og dagføring av kloakkum í miðbýnum og til framhald av arbeiðinum sambært spillivatnsætlanini.

Tørvur er á at hækka vatnbyrgingina í Villingardali, soleiðis at tørvurin í kommununi verður nøktaður á haldgóðan hátt. Eftir ætlan byrjar arbeiðið í 2023, og verður liðugt í 2025.

Kommunan skal gerast meira grøn og burðardygg. Arbeitt verður tí framhaldandi við íløgum í orku- og umhvørvistiltøk, sum kunnu vera við til at minka um elnýtslu, oljunýtslu og koltvíiltuútlát.

**Renovatión**
Kommunan veksur skjótt, og virksemið økist. Brennistøðin á Hjalla er gomul og niðurslitin, og nøktar ikki núverandi og komandi tørv. Ásannað verður tí, at tørvur er á nýggjari brennistøð. Eftir ætlan verður farið undir at projektera nýggja brennistøð í 2021 fyri síðani at fara undir at byggja hana í 2023. Eftir ætlan skal nýggja brennistøðin takast í nýtslu í 2025–26.

**Smábátahavnir**
Íløgur verða gjørdar í smábátahavnir til framhaldandi at betra um umstøðurnar hjá smábataeigarum. Ætlanin er at seta pening av til nýggja smábátahavn í Álakeri við 250 bátaplássum, sum kann vera liðugur í 2021.

**Langtíðar íløguætlanin 2021-25**
Niðanfyri er útgreinað langtíðar íløguætlan fyri árini 2021–25 fyri tær størru verkætlanirnar.

| **Býráðsfundur**<br>28. november 2019 | Blað nr.: 1249<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

| | Ætlan 2020 | Ætlan 2021 | Ætlan 2022 | Ætlan 2023 | Ætlan 2024 | Ætlan 2025 | Tils 20-25 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | |
| **§2 Almanna- og heilsumál** | **67.000.000** | **5.000.000** | **90.000.000** | **70.000.000** | **0** | **1.000.000** | **233.000.000** |
| Tannlæknamiðstøð | | | | | | 1.000.000 | 1.000.000 |
| Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 10.000.000 | | | | | | 10.000.000 |
| Umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 57.000.000 | | | | | | 57.000.000 |
| Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | | 4.000.000 | 80.000.000 | 70.000.000 | | | 154.000.000 |
| Eldradepil í Kollafirði | | 1.000.000 | 10.000.000 | | | | 11.000.000 |
| | | | | | | | |
| **§3 Børn og ung** | **18.200.000** | **0** | **1.000.000** | **8.000.000** | **9.000.000** | **0** | **36.200.000** |
| Um- og nýbygging av dagsstovnum (Vesturi á Flat) | 18.200.000 | | | | | | 18.200.000 |
| Dagføring av dagstovninum á Argjum | | | 1.000.000 | 8.000.000 | 9.000.000 | | 18.000.000 |
| | | | | | | | |
| **§4 Undirvísing** | **116.000.000** | **0** | **10.000.000** | **20.000.000** | **20.000.000** | **20.000.000** | **186.000.000** |
| Hoyvíkar skúli | | | 10.000.000 | 10.000.000 | 20.000.000 | 20.000.000 | 60.000.000 |
| Skúlin á Fløtum | 116.000.000 | | | | | | 116.000.000 |
| Sankta Frans skúli | | | | 10.000.000 | | | 10.000.000 |
| | | | | | | | |
| **§5 Mentan og frítíð** | **17.500.000** | **111.000.000** | **107.000.000** | **17.000.000** | **8.000.000** | **5.490.000** | **265.990.000** |
| Býarsavn/bókasavn | | 3.000.000 | 3.000.000 | 2.500.000 | | | 8.500.000 |
| Tórsvøllur | | | 2.500.000 | 6.500.000 | 8.000.000 | 5.490.000 | 22.490.000 |
| Langhylur | 4.000.000 | 50.000.000 | 66.000.000 | | | | 120.000.000 |
| Byrsumúli | 3.000.000 | 4.000.000 | 1.000.000 | | | | 8.000.000 |
| Golf | 3.500.000 | 6.000.000 | 8.500.000 | 8.000.000 | | | 26.000.000 |
| Stórhøll | | 20.000.000 | 5.000.000 | | | | 25.000.000 |
| Fimleikahøll í Kaldbak | | 7.000.000 | 3.000.000 | | | | 10.000.000 |
| Vøllur í Hoyvík | 1.000.000 | 10.000.000 | 15.000.000 | | | | 26.000.000 |
| Tórsbreyt, nýgg ljós | 1.000.000 | | | | | | 1.000.000 |
| Ljós til vøllir, Gundadalur, Argir v.m. | | 7.000.000 | | | | | 7.000.000 |
| Ítróttaranlegg vøllir, Gundadalur og Argir | 5.000.000 | 4.000.000 | 3.000.000 | | | | 12.000.000 |
| | | | | | | | |
| **§6 Teknisk mál** | **21.700.000** | **60.700.000** | **53.525.000** | **49.500.000** | **53.500.000** | **53.500.000** | **292.425.000** |
| Súkklugøtur og skýli | 1.000.000 | 2.000.000 | 2.000.000 | | | | 5.000.000 |
| Vágsbotnur/Miðbýur | | 7.000.000 | 7.000.000 | | | | 14.000.000 |
| Fríðkan av býnum | 5.000.000 | | | | | | 5.000.000 |
| Kirkjugarðar (Velbastaðvegur) | 4.000.000 | 3.200.000 | | | | | 7.200.000 |
| Orkupolitikkur - átøk ísv politikkin | 5.000.000 | 13.500.000 | 13.500.000 | 13.500.000 | 13.500.000 | 13.500.000 | 72.500.000 |
| Kloakkir | 3.000.000 | 5.000.000 | 5.000.000 | 5.000.000 | 5.000.000 | 5.000.000 | 28.000.000 |
| Parkering | | 5.000.000 | 5.000.000 | 15.000.000 | 15.000.000 | 15.000.000 | 55.000.000 |
| Innkomuvegur | | 4.000.000 | 15.000.000 | 15.000.000 | 10.000.000 | 10.000.000 | 54.000.000 |
| Landavegur (3. byggistig) | 3.700.000 | | | | | | 3.700.000 |
| Vegagerð | | 17.000.000 | | | | | 17.000.000 |
| Vatnbyrging í Villingardali | | | | 1.000.000 | 10.000.000 | 10.000.000 | 21.000.000 |
| Rakstrargøgn (Verkstaðið) | | 4.000.000 | 6.025.000 | | | | 10.025.000 |
| | | | | | | | |
| **§7 Kommunal virki** | **17.200.000** | **23.000.000** | **12.000.000** | **110.000.000** | **110.000.000** | **110.000.000** | **382.200.000** |
| Renovatión | | 8.000.000 | 12.000.000 | 110.000.000 | 110.000.000 | 110.000.000 | 350.000.000 |
| Talgilding Føroyar | 5.600.000 | | | | | | 5.600.000 |
| Bylgjubrótari í Kollafirði | 1.600.000 | | | | | | 1.600.000 |
| Smábátahavn Álakeri | 10.000.000 | 15.000.000 | | | | | 25.000.000 |
| | | | | | | | |
| | **257.600.000** | **199.700.000** | **273.525.000** | **274.500.000** | **200.500.000** | **189.990.000** | **1.395.815.000** |

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Kunnað varð um málið.

## 290/19 Umsókn um umbýti av grundøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 260/19 | 19/03776-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 293/19 | 19/03776-6 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 299/19 | 19/03776-6 |
| 4 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 290/19 | 19/03776-6 |

**Upprunin til málið:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi fíggjarnevndarfund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsøkjari hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at fáa loyvi at býta sítt grundøki við útstykkingina Klingurstjørn 2, t.e. grundøki nr. 19, um við annað grundøki í ústykkingini, ið upprunaliga varð tillutað øðrum umsøkjar. Fyrisitingin hevur ikki mett, at grundarlag er fyri slíkum umbýti, og hetta hevur umsøkjarin fingið fráboðan um.

Tveir umsøkjarar meldaðu til, og fingu tillutað grundøki í lutakastinum um grundøkini í útstykkingini við Klingurstjørn 2.

Annar umsøkjarin hevur undirritað skeytið, og goldið fyrsta gjald sambært treytunum.

Hin umsøkjarin helt aftur, og at enda boðaði løgdeildin frá, at hevði hann ikki goldið fyrsta gjald innan 1. august 2019, varð grundøkið tillutað øðrum við lutakasti sambært mannagongdini. Umsøkjarin valdi ikki at rinda.

Tann 30. august 2019 sendi annar umsøkjarin umbøn um at fáa loyvi at býta um grundøki, vísandi til kunningina í Posthúskjallaranum tann 7. februar 2019. Og 1. september 2019 sendi hann skermmynd av samskiftinum millum seg og umsøkjaran, sum ikki hevði goldið fyrsta gjald fyri grundøkið, har váttað varð, at hesin hevur keypt hús, og ikki skal brúka grundøkið, sum honum var tillutað.

Kunningin í Posthúskjallaranum, sum víst varð á, snúði seg m.a. um nær kommunan kann loyva umbýti av grundøki.
.

Tað er so, at grundreglan er, at tað er lutakast sum avgerð, hvat grundøkið ein fær tillutað.

Tí er mannagongdin tann, at um tveir partar, sum hava fingið tillutað hvør sítt grundøki við lutakasti, eru samdir um at býta um og keypa grundøki hjá hvørjum øðrum, tí tað hóskar betur til teirra byggiætlanir, so loyvir kommunan hesum, tí ongin missur nakað av tí.

Er tað hinvegin so, at ein letur sítt grundøki inn aftur til kommunan, ella kommunan tekur tað inn aftur, tí ein ikki heldur treytirnar, so verður kastað lut um hetta grundøkið av nýggjum.

Grundgevingin fyri hesum er, at um ein ikki tekur av tí grundøki, ein fær tillutað, so átti hetta grundøki av røttum at verið tillutað ein av teimum umleið 80 tilmeldaðu, ið onki

grundøki fingu tillutað, tá upprunaliga lutakastið um Klingurstjørn 2 var avgreitt.

Soleiðis hevur mannagongdin verið, síðani Myllutjørn varð útlutað, og tí hava øll tey mongu við Karlamagnusarbreyt, Oman Gil, Klingurstjørn 1 og 2, sum hava spurt um loyvi at býta um við grundøki, ið eru latin kommununi aftur, fingið at vita, at tað ber ikki til, tí slík grundøki eiga av røttum at vera tillutaði við lutakasti millum tey, ið onki fingu í upprunaliga lutakastinum.

Um mannagongdin ikki var soleiðis, hevði avleiðingin verið hon, at tey, sum onki grundøki fingu við upprunaliga lutakastið, men sum sambært aðalregluni eiga at hava eins góðan møguleika at fáa eitthvørt grundøki við lutakastinum, bert høvdu fingið tey "vánaligu" grundøkini at kasta lut um aðru ferð, eftir at tey, sum fingu grundøki tillutað í upprunaliga lutakastinum, høvdu býtt tey "góðu" grundøkini sínamillum, og lati tey "vánaligu" inn aftur.

Skal henda mannagongd broytast, má Snarskivan seta seg í samband við øll tey, sum hava spurt um at býta um við innlatin grundøki og siga frá hesum. Og so má gerast ein leistur fyri, hvussu slíkt umbýta skal fara fram, tí tað eru sjálvandi fleiri, ið ynskja sama innlatna grundøki.

Tann 13. september 2019 svaraði Tórshavnar kommunan umsøkjaranum, at umbønin um umbýti kundi ikki gangast á møti, tí borgarar kunnu bert býta grundøki sínamillum, um báðir partar ynskja tað. Altso tí teir báðir heldur vilja byggja á grundøkinum hjá hinum partinum.

Í hesum føri er ikki talan um slíkt umbýti av grundøkjum.

Annar eigarin hevur ongantíð rindað fyri sítt grundøki, og fekk í skrivi freist til 1. august 2019 at rinda. Eftir tað fóru vit at luta grundøkið út umaftur millum tey, ið onki grundøki fingu í upprunaliga lutakastinum, varð fráboðað honum.

Harumframt varð víst á, at viðkomandi eigari ikki ætlaði at byggja á grundøkinum, tí húskið hevur keypt hús.

Sostatt er talan um, at býta um við eitt grundøki, ið kommunan hevur ræðið á.

Tað loyvir kommunan ikki, tí mannagongdin er tann, at grundøki, ið koma kommununi aftur í hendi, skulu lutast út millum tey, ið vóru við, men onki grundøki fingu í upprunliga lutakastinum, varð sagt frá.

Í grein 10 í grundstykkjareglugerðini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at "Í serligum føri kann Tórshavnar kommuna gera av, at møguleiki kann vera fyri umbýti av fastognini, sum tygum fáa tilluttað, um onnur fastogn er tøk."

Nærri ásetingar eru ikki um, nær talan er um slíkt serligt føri, at loyvt skal vera at býta um fastognina við aðra fastogn, ið er tøk. Mett verður tó ikki, at fyriliggjandi mál er av slíkum slag, at tað kann koma undir hesa áseting, tí upplýstar eru ikki nakrar serligar umstøður, ið kunnu grunda slíkt undantak.

Mælt verður tískil frá at loyvi umsøkjarnum at fáa aðra ogn enn hana, hann hevur fingið tillutað í lutakastinum.

Skal undantak gerast í hesum førinum, mugu hinir eigararnir av ognum í útstykkingini fáa sama møguleika at býta sína ogn um við grundøki, ið eru latin inn aftur til Tórshavnar kommunu. Hetta vísandi til líkaregluna í fyrisitingarrættinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað eru 9 óseld grundøki við Klingurstjørn 2. Hesi verða lutaði út millum tey 74, sum onki fingu fyrstu og aðru ferð Snarskivan, hevur lutað út grundøki við Klingurstjørn 2. Lutakastið verður fyrireikað í løtuni, og Snarskivan samskiftir við tey 74 um luttøkuna og treytirnar fyri lutakastinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og leiðarin á Snarskivuni mæla til, við støði í omanfyri lýstu, og higartil nýttu mannagongd fyri umbýti av grundøki, at fíggjarnevndin letur avgerðina hjá Snarskivuni standa við.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Málið er útsett.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Ein meiriluti, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir býráðnum til at loyva umsøkjaranum at býta um grundstykki vísandi til grein 10 í grundstykkjareglugerðini, av tí at mett verður, at umsøkjarin lýkur treytirnar fyri umbýti sambært hesi áseting. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen.

# 291/19 Matr.nr. 22s, Kaldbak. Eigari vil selja grundstykkið til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 298/19 | 19/04251-3 |
| 2 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 291/19 | 19/04251-3 |

**Upprunin til málið:**

Verandi eigarar keyptu grundstykkið frá kommununi í desember 2017 fyri kr. 215.000,00

Eigarar boða frá, at tey hava avgjørt, at keypa eini hús, og tískil eru noydd til, at selja grundstykkið, ella at lata grundstykkið aftur til kommununa.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Grundstykkið er til víddar 519m2, og er ikki útgrivið.

Sambært grein 5 í skeytinum, hevur keyparin ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum, ella at kommunan gevur loyvi til søluna.

Tað kann viðmerkjast, at kommunan seldi grundstykki hjá meklara til ásettan minstaprís kr. 200.000,00 og fingu verandi eigarar stykkið til keyps fyri kr. 215.000,00

Øll stykkini í útstykkingini eru seld, harav eru 4 sethús liðugt bygd, og er bygging byrjað á tveimum stykkjum. Fýra grundstykkir liggja framvegis óútgrivin.

Á byráðsfundi 26. September, samtykti býráðið, viðvíkjandi øðrum stykki í útstykkingini, ikki at keypa óbygda grundstykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum vísandi til, at stykkið er selt í fríðari sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógvin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn. Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Líknandi viðgerð í máli 19/03004

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá eigara. Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri** | **Fyri ávís** | **Fyri ávísar** | **Fyri** |
|---|---|---|---|---|

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til ikki at keypa grundstykkið aftur, men í staðin at loyva víðarisølu av grundstykkinum vísandi til, at stykkið er selt í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 23:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |